

Eftirmeting av

# Tí góðu tilgongdini

Autismufelagið, Heilsumálaráðið, Kommunufelagið,
Barna- og útbúgvingarmálaráðið og Almanna- og mentamálaráðið



**Tilmæli: Eftirmeting av Tí góðu tilgongdini**
Útgevari: Almanna- og mentamálaráðið
Útgivið: 5. mars 2024
Talgild útgáva (PDF fíla) kann takast niður av heimasíðuni hjá ammr.fo
Uppseting: Anna & annað – Anna Simonsen

# Innihaldsyvirlit

**1. Samandráttur** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 4

**2. Tilmælir** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 6

**3. Innleiðing** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 8

**4. Arbeiðssetningur** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 9

**5. Arbeiðsleistur** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 10

**6. Hvussu virkar Tann góða tilgongdin í dag?** 12
- 6.1 Tillagingar í íverksetanartilgongdini . . . . . . 12
- 6.2 Tillagingar „Tá ábending er um autismu“ . 13
  - 6.2.1 Stúrin um barnið. . . . . . . . . . . . . . . 14
  - 6.2.2 Tilmelding til Sernám . . . . . . . . . . . 14
  - 6.2.3 Ráðgeving til dagstovn og skúla . . . 15
  - 6.2.4 Uppfylgjandi samrøður hjá sálarfrøðingi . . . . . . . . . . . . . . . 15
  - 6.2.5 Ávísing til B&U psykiatri . . . . . . . . 16
  - 6.2.6 Barnakanning hjá kommunulækna. 16
  - 6.2.7 Samanumtøka . . . . . . . . . . . . . . . . . 16
- 6.3 Tillagingar „Tá autisma er staðfest“ . . . . . . 18
  - 6.3.1 Undirvísing til foreldur . . . . . . . . . . 19
  - 6.3.2 Eitt toymi . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 19
  - 6.3.3 Innkalling til fundir. . . . . . . . . . . . . 20
  - 6.3.4 Samskiparin og árligi fundurin . . . . 20
  - 6.3.5 Virkisætlan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 21
  - 6.3.6 Samskifti í gerandisdegnum . . . . . . 21
  - 6.3.7 Kreppuhjálp . . . . . . . . . . . . . . . . . . 21
  - 6.3.8 Samanumtøka . . . . . . . . . . . . . . . . . 21
- 6.4 Tillagingar „Tá barnið fer í skúla“ . . . . . . . 23
  - 6.4.1 Støðumeting í sambandi við skúlabyrjan . . . . . . . . . . . . . . . . 23
  - 6.4.2 Hóskandi skúlatilboð . . . . . . . . . . . 23
  - 6.4.3 Skipað skifti millum dagstovn og skúla . . . . . . . . . . . . . . 23
  - 6.4.4 Samanumtøka . . . . . . . . . . . . . . . . . 24
- 6.5 Tillagingar „Tannárini – vaksnamannatilveran“ . . . . . . 25
  - 6.5.1 Støðumeting og vaksnamannatilveran. . . . . . . . . . . . 25
  - 6.5.2 Skúlavegleiðing til børn við autismu 25
  - 6.5.3 Samanumtøka . . . . . . . . . . . . . . . . . 25
- 6.6 Niðurstøða . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 27

**7. Samskiparaleikluturin** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 30
- 7.1 Leikluturin og uppgávurnar hjá samskiparanum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 30
- 7.2 Samanumtøka . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 31

**8. Avbjóðingar og tørvur á tillagingum** . . . . . 32
- 8.1 Ávísingartilgongdin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 32
- 8.2 Ráðgeving til dagstovnar, skúlar og foreldur 34
- 8.3 Fyrsti fundurin eftir útgreining . . . . . . . . . . 36
- 8.4 TGT-fundirnir í Almannaverkinum . . . . . . 37
  - 8.4.1 Fundir í skiftum . . . . . . . . . . . . . . . . . 38
- 8.5 Samanumtøka . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 40

**9. Aðrar tillagingar í mun til fundir** . . . . . . . . . 41
- 9.1 Tannárini – vaksnamanna tilveran. . . . . . . . 41
- 9.2 Talgild luttøka . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 41
- 9.3 Møgulig víðkan av aldursbólkinum, sum kann fáa lut í TGT. . . . . . . . . . . . . . . . 41
- 9.4 Møgulig víðkan av samskiparaleiklutinum . 42
- 9.5 Mannagongd fyri tillagingum . . . . . . . . . . . 43
- 9.6 Samstarv millum partarnar rundanum netfundir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 45

**10. Fíggjarligar avleiðingar** . . . . . . . . . . . . . . . . 46

# 1. Samandráttur

Samanumtikið staðfestir eftirmetingin, at semja er um at TGT er ein góð hjálp fyri familjur við børnum, ið hava autismu, tá ið TGT virkar eftir ætlan. Tó eru fleiri avbjóðingar í skipanini í dag og tørvur er á at tillaga og nýhugsa skipanina, um hon aftur skal virka sum eitt samskipandi forum, ið lættir um hjá familjunum. Harafturat kann viðmerkjast, at hóast TGT er ein góð skipan, so loysir hon ikki teir trupulleikar, sum standast av, at tilboð og játtan mangla.

Eftirmetingin vísir, at tað eru nógvar tillagingar gjørdar, bæði í og rundanum TGT, síðani skipanin fór at virka í 2015. Arbeiðsbólkurin kann staðfesta, at í flestu førum eru hesar ikki góðkendar í stýrisbólkinum og heldur ikki avtalaðar millum partarnar frammanundan.

Tað gjørdist skjótt greitt fyri arbeiðsbólkinum, at semja ikki var millum partarnar, tá ið talan er um ávísing til B&U Psykiatriina. Leisturin fyri ávísing er broyttur, við tað at allar ávísingar í dag skulu umvegis kommunulæknan og hóast flest allir partar kenna hesa mannagongd, eru teir ymiskir á máli um, hvørt hetta er skynsamasta loysnin. Eisini eru ábendingar um, at tað eru uppgávur, sum ikki verða loftaðar í nøktandi mun. Tí mælir arbeiðsbólkurin til, at politisk støða verður tikin til, hvør ella hvørji skulu ávísa til B&U Psykiatriina, og hvussu uppgávubýtið skal vera millum partarnar.

Ráðgeving til familjurnar verður veitt av nógvum ymiskum pørtum og yvirskipað sær tað ikki út til at vera nóg væl samskipað. Arbeiðsbólkurin mælir tí til at eitt greiðari uppgávu- og ábyrgdarbýti verður gjørt millum partarnir, sum veita ráðgeving, og at ráðgevingin rundanum barnið verður samskipað.

Samanumtikið metir arbeiðsbólkurin at tann fyrsti fundurin, aftaná útgreining, er ein góður og neyðugur fundur, har allir partar, sum eru um barnið, hittast, og útgreiningin verður løgd fram. Tó tykist tað sum um, at í fleiri førum eru ov nógvir partar bodnir við. Í summum førum, er tað ikki greitt fyri øllum pørtum, at talan er um ein TGT fund fyrrenn møtt verður á fundinum og fáa tí ikki fyrireika seg í nøktandi mun.

Arbeiðsbólkurin mælir tí til, at B&U psykiatri tryggjar at tey, sum luttaka á fundinum, í størst møguligan mun frameftir hava ein virknan leiklut í lívinum hjá barninum og at partarnir vita at talan er um ein TGT fund, áðrenn møtt verður.

Ein orsøk til avbjóðingarnar er, at tørvurin er størri enn upprunaliga mett, eins og at ábendingar eru um, at arbeiðsorka í ymisku skipanunum ikki samsvarar við verandi tørv. Harumframt er umleið tvey ára bíðitíð til útgreining hjá B&U Psykiatriini og gevur hetta ábendingar um, at tað er ein vaksandi tørvur.

Økta talið av familjum hevur við sær, at tað samanlagt eru fleiri fundir, enn upprunaliga mett, ið ger tað truplari hjá pørtunum, at luttaka á øllum fundum. Afturat hesum kemur, at partarnir hava broytt innanhýsis mannagongdir, sum eisini hevur ávirka luttøkuna í TGT. Úrslitið av hesum, er at uppmøtingin ikki altíð er nøktandi og at fleiri fundir hava ikki verða hildnir.

Við verandi skipan fáa familjurnar ein árligan

fund, tann mánaðin barnið hevur føðingardag. Royndirnar vísa, at í teimum førum har støðan er góð og ongar avbjóðingar eru í gerandisdegnum, er ikki neyðugt at hava árligar fundir. Tað eru ofta skiftini, ið eru serliga trupul hjá børnum við autismu, og er tað eisini tá tað er eyka tørvur á samskipan.

Arbeiðsbólkurin mælir tí til, at leisturin fyri TGT-fundirnar verður endurskoðaður, so at tað frameftir verða hildnir færri og meira málrættaðir fundir, ið taka útgangsstøði í skiftunum hjá barninum. Arbeiðsbólkurin metir, at talið av skiftum, luttakarar, innihaldið, eins og hvussu hetta skal skipast í praksis má gerast saman við teimum stovnum, sum eru partar av TGT, umframt Autismufelagnum.

Arbeiðsbólkurin er greiður yvir, at støðurnar hjá familjunum eru sera ymiskar og at ein minking í fundarvirkseminum kann hava ta avleiðing, at tey, ið hava størsta tørvin á samskipan, kunnu detta niður ímillum. Arbeiðsbólkurin mælir tí til, at Almannaverkið, ið hevur samskiparaleiklutin, hevur árligt samskifti við familjuna, og út frá hesum ger eina meting av støðuni. Um tørvur er á samskipan uttanum skiftini, kann samskiparin, heilt ella partvís, samla toymið rundanum barnið.

Eftirmetingin vísir, at hóast uppgávur og avtalur verða avtalaðar á fundinum og skrivaðar í virkisætlanina, so verða hesar ikki altíð framdar í verki; hetta kann koma fyri ár eftir ár. Í hesum førum hoyra foreldrini ofta einki aftur frá pørtunum og eru tey sjálvi noydd til at fylgja upp eftir fundin. Arbeiðsbólkurin metir, at tørvur er á at fylgja upp upp á avtalur, sum eru gjørdar á TGT fundum og mælir tí til, at uppgávu- og ábyrgdarbýtið verður greitt ásett millum partarnar soleiðis, at tað altíð verður fylgt upp eftir fundir, og at foreldur altíð fáa kunning um tær avtalur, sum eru avtalaðar á fundinum og á hvønn hátt tær verða framdar í verki.

Harumframt verður mælt til, at samskiparaleikluturin formliga verður staðsettur hjá Almannaverkinum, at tann ungi verður boðin at luttaka á fundum í viðkomandi skiftum, at man í størri mun tekur størri atlit at landafrøðiligu og praktisku viðurskiftunum hjá pørtunum, eins og at møguleikin, fyri at víðka skipanina til, í ávísum førum, at fevna um ung, sum eru fylt 18 ár, verður lýstur.

Sum víst á omanfyri, eru fleiri tillagingar gjørdar gjøgnum árini, uttan at hesar eru avtalaðar millum partarnar. Arbeiðsbólkurin metir tað vera óheppið, at ongin fastur leistur er fyri broytingum í TGT og mælir tí til at ein slíkur verður orðaður, ið ásetur at allar broytingar verða viðgjørdar og góðkendar av stýrisbólkinum, eftir tilmæli frá leiðslunum, ið varða av TGT. Tryggjast skal, at Autismufelagið og aðrir viðkomandi partar eru hoyrdir, áðrenn tilmæli verða løgd fyri stýrisbólkin.

Harafturat verður mælt til, at leiðslurnar, sum varða av TGT, umframt Almannaverkið, Sernám, B&U Psykiatri, eisini fevna um Undirvísingarstýrið og dagstovnaøkið.

# 2. Tilmælir

1. Mælt verður til, at politisk støða verður tikin til, hvør ella hvørji skulu ávísa til B&U psykiatri, og hvussu uppgávubýtið skal vera millum partarnar. Tað er neyðugt at kanna, hvør ella hvørji hava neyðugu førleikarnir til at ávísa. Neyðugt er samstundis at tryggja, at neyðug fígging verður sett av til hetta arbeiðið.

2. Mælt verður til at eitt greiðari uppgávu- og ábyrgdarbýti verður gjørt millum dagstovnaøkið, førleikastovur, Sernám, Heimaráðgevingina og B&U psykiatriina við tí endamáli at samskipa ráðgevingina um barnið.

3. Mælt verður til, at B&U psykiatriin tryggjar, at tey, sum luttaka á fundinum í størst møguligan mun eru tey, sum frameftir hava ein virknan leiklut í lívinum hjá barninum.

4. Mælt verður til, at B&U psykiatriin í størst møguligan mun tryggjar, at partarnir vita, at talan er um ein TGT fund áðrenn fundin, og tekur støðu til hvør kann og hvør skal hava útgreiningina/niðurstøðurnar áðrenn fundin.

5. Mælt verður til, at TGT fundir vera í týdningarmiklu skiftunum hjá børnunum. Mælt verður til at partarnar í felag nágreina skiftini, innihaldið á fundinum, tíðspunktið fyri fundirnar og luttakarar.

6. Mælt verður til, at samskiparin framhaldandi hevur árligt samband við foreldrini um støðuna hjá barninum og út frá hesum metir, um tørvur er á eyka samskipan, og harvið eyka fundi, í millum skiftini. Nágreinast skal, hvat útloysir eyka fund og í hvørjum førum, hini í toyminum um barnið, kunnu venda sær til samskiparan um eyka fund. Útgangsstøðið má vera at talan er um tørv á samskipan.

7. Mælt verður til, at Almanna- og mentamálaráðið skipar fyri einum arbeiðsdegi, har avvarðandi partar sita saman og viðgera og nágreina hvussu nýggi leisturin í TGT skal skipast í praksis.

8. Mælt verður til, at tann ungi verður boðin at luttaka á fundum í viðkomandi skiftum, og at tað verður nágreinað, hvørji skifti talan er um, á arbeiðsdegi millum partarnar.

9. Mælt verður til, at man í størri mun tekur atlit til landafrøðiligu og praktisku viðurskiftini hjá pørtunum, harundir nær og um tað skal vera møguligt at luttaka talgilt, ella um tað í fleiri førum skal vera møguligt at hava fundin lokalt.

10. Mælt verður til at lýsa møguleikan fyri at víðka skipanina til, í ávísum førum, at fevna um ung, sum eru fylt 18 ár, hvussu hetta kann skipast og hvat ein tílík skipan kostar.

11. Mælt verður til, at tað formliga verður staðfest, at Almannaverkið hevur samskiparaleiklutin og at hesin verður nágreinaður, so at tað gerst greitt fyri øllum pørtum hvør uppgávan og leikluturin hjá samskiparanum er.

12. Mælt verður til, at fylgt verður upp eftir fundir, og at uppgávu- og ábyrgdarbýti verður avtalað á arbeiðsdegi millum partarnar.

13. Mælt verður til, at Almannaverkið ger árligar støðufrágreiðingar, og sendir hesar til avvarðandi stjórnarráð og leiðslurnar, ið varða av TGT.

14. Mælt verður til, at ásett verður, at leiðslurnar, ið varða av TGT eru Almannaverkið, Sernám, B&U psykiatri, Undirvísingarstýrið og eitt umboð fyri dagstovnaøkið, ið Kommunufelagið velur.

15. Mælt verður til, at leiðslurnar, ið varða av TGT, hava ein árligan fund har støðufrágreiðingarnar verða viðgjørdar, og møgulig tilmælir um broytingar verða gjørd. Mælt verður til, at Almannaverkið bjóðar til hesar fundir.

16. Mælt verður til, at allar broytingar av TGT verða viðgjørdar og góðkendar av stýrisbólkinum. Mælt verður í hesum sambandi til, at avvarðandi leiðslur gera ítøkilig tilmæli til stýrisbólkin um broytingar. Leiðslurnar skulu somuleiðis tryggja, at Autismufelagið og aðrir viðkomandi partar eru hoyrdir, áðrenn tilmæli verða løgd fyri stýrisbólkin.

17. Mælt verður til, at leiðslurnar fyri Almannaverkið, B&U psykiatriina og Sernám gera eitt tilmæli til stýrisbólkin fyri TGT um, hvørt dialogfundirnir skulu takast uppaftur, í hvørjum líki hetta so skal gerast, og hvørjir partar verða mettir viðkomandi at luttaka á dialogfundum.

# 3. Innleiðing

Borgarar, sum bera brek, hava ofta tørv á tænastum frá nógvum ymiskum stovnum og myndugleikum. Tað hevur víst seg, at borgarin og avvarðandi uppliva manglandi samskipan millum tænastur, og hevur tað stóra ávirkan á gerandisdagin hjá nógvum familjum. Umframt neiligu ávirkanina á persónligu vælferðina, hjá teimum, ið bera brek og teirra avvarðandi, kann manglandi samskipan avmarka møguleikan hjá tí einstaka at mennast og liva eitt sjálvstøðugt lív, eins og avvarðandi ikki fáa liva og virka á arbeiðsmarknaðinum á jøvnum føti við onnur. Hetta kann so aftur hava við sær samfelagsligar og fíggjarligar avleiðingar fyri samfelagið alt.

Í 2013 varð farið undir eina verkætlan, sum hevði til endamáls at skipa eina samanhangandi tænastu tvørtur um fakligar geirar og ráðharramálsøki saman við og fyri foreldur at børnum við autismu, so teirra gerandisdagur gjørdist lættari. Úrslitið varð eitt tilmæli við heitinum „Tann góða tilgongdin“. Skipanin varð sett í verk, sum eitt svar upp á manglandi samskipan á økinum, og var ætlanin at skipanin skuldi verða byrjanin upp á eina størri samskipaða tænastu frá almenna geiranum, ið síðani skuldi víðkast til at fevna um børn, ið bera onnur brek enn autismu.

Landsstýrið hevur í samgonguskjalinum ásett, at skipanin við Tí góðu tilgongdini skal eftirmetast og víðkast. Tað hevur týdning fyri landsstýrisfólkini, at allir partar taka undir við hesari eftirmeting og gera sín part fyri at tænasturnar verða samskipaðar mest møguligt.

Sí „Tilmælið um at skipa eina góða tilgongd“

Eftirmeting verður gjørd saman við Heilsumálaráðnum, Barna- og útbúgvingarmálaráðnum, Kommunufelagnum og Autismufelagnum. Hesir partar varða í hvør sínum lag av teimum stovnum og skipanum, sum skulu samstarva fyri at Tann góða tilgongdin kann virka eftir ætlan. Autismufelagið umboðar teir borgarar, sum gagnnýta Tí góðu tilgongdina.

Tey, sum hava mannað arbeiðsbólkin eru:

- Barbara Á. Thomsen frá Almanna- og mentamálaráðnum (forkvinna)
- Ann Kristina S. Simonsen frá Almanna- og mentamálaráðnum
- Andreas Sjóvará frá Heilsumálaráðnum,
- Joan Knudsen frá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum
- Janus Haraldsen frá Kommunufelagnum
- Gunnvá Staksberg (Djóni á Boðanesi frá september 2022 til apríl 2023) frá Autismufelagnum

# 4. Arbeiðssetningur

Landsstýrisfólkini í almanna- og mentamálum, barna- og útbúgvingarmálum og heilsumálum hava sett ein stýrisbólk við Eyðun Mohr Hansen, aðalstjóra í Almanna- og mentamálaráðnum, Poul Geert Hansen, aðalstjóra í Barna- og útbúgvingarmálaráðnum, Turid Arge, aðalstjóra í Heilsumálaráðnum (frá 1. januar 2024 Bjørgfríð Ludvig, virkandi aðalstjóra), Eyðun Christiansen frá Kommunufelagnum og Randi Durhuus frá Autismufelagnum (frá september 2022 til apríl 2023 Jónrit Halling).

Harumframt verður settur ein arbeiðsbólkur við umboðum frá omanfyrinevndu stjórnarráðum, Kommunufelagnum og Autismufelagnum. Almanna- og mentamálaráðið hevur formansskapin í arbeiðsbólkinum, aðalstjórin í Almanna- og mentamálaráðnum er formaður í stýrisbólkinum.

Arbeiðsbólkurin skal:

- Lýsa og greina hvussu Tann góða tilgongdin virkar í dag og um broytingar eru gjørdar í Tí góðu tilgongdini.
- Lýsa og greina í hvønn mun leisturin við einum samskipara virkar í mun til endamálið.
- Lýsa og greina um tørvur er á tillagingum fyri, at TGT skal virka, sambært tí upprunaliga endamálinum.
- Arbeiðsbólkurin skal koma við tilmælum um neyðugt er við tillagingum í TGT, harundir um fíggjarligar- og fyrisitingar broytingar eru neyðugar.

Um arbeiðsbólkurin gerst varugur við annað, sum kann hava týdning fyri eftirmetingina, skal arbeiðsbólkurin taka hetta við sum ein part av ftirmetingini.

Henda eftirmeting skal ikki viðgera um TGT kann víðkast til aðrar málbólkar. Ein møgulig víðkan av skipanini verður viðgjørd eftirfylgjandi.

Arbeiðsbólkurin skal tryggja, at tey, ið eru partur av TGT verða hoyrd og í tann mun tørvur er á tí, skipa fyri hoyringarfundum við umboðum fyri teir stovnar og feløg, ið veita tænastur í tráð við Tí góðu tilgongdina.

Arbeiðið verður handað 5. mars 2024.

# 5. Arbeiðsleistur

Tann góða tilgongdin byggir á eitt tilmæli frá 2014 um eina samskipaða tilgongd. Landsstýrisfólkini í táverandi Almannamálaráðnum, Mentamálaráðnum og Heilsumálaráðnum og formanninum í Kommunufelagnum undirskrivaðu samstundis eina yvirlýsing, um at fylgja tilmælinum í størst møguligan mun.

Tá ið tilgongdin varð sett í verk, varð ein faldari gjørdur, sum lýsir avtalaða leistin. Arbeiðsbólkurin hevur tikið støði í hesum faldara, sum er ætlaður foreldrum at børnum við autismu, og foreldrum, sum eru stúrin um, at barn teirra hevur autismu.

Faldarin er ein vegleiðing til foreldur um innihaldið í Tí góðu tilgongdini.

Faldarin er býttur upp í 4 partar:

- Tá ábending er um autismu
- Tá autisma er staðfest
- Tá barnið fer í skúla
- Tannárini – vaksnamannatilveran.

Faldarin útgreinar hvussu tilgongdin er á hvørjum stigi sær, hvør stovnur lyftir hvørja uppgávu, hvat familjan kann vænta, og hvat hon hevur rætt til.

Við støði í faldaranum vórðu spurningar sendir út í september 2022. Tey, sum fingu spurningarnar at svara, vóru Autismufelagið, Almannaverkið, Sernám, Barna- og Ungdómspsykiatriin (Familjudepilin á Landssjúkrahúsinum), Undirvísingarstýrið, Gigni, allar kommunulæknaviðtalur, allir skúlar, flest allir frítíðarskúlar og dagstovnar, námsfrøðiligir ráðgevar í kommunum og barnaverndartænasturnar.

Hóast hesir partar allir fingu høvi at svara, vóru tað ikki allir partar, sum vendu aftur til arbeiðsbólkin. Leggjast kann afturat at svarini, í fleiri førum, vóru merkt av, at í tíðarskeiðinum, spurningarnar vóru sendir út, hevði Sernám, vegna starvsfólkamangul, avmarkað sítt virksemi á dagstovnaøkinum. Sernám hevur greitt frá, at virksemið var avmarkað soleiðis, at eingi nýggj mál vóru byrjað, uttan so at talan var um børn, ið skuldu byrja í skúla ella forskúla komandi ár, ella talan var um børn, sum vóru fødd við breki.

Út frá svarunum, sum arbeiðsbólkurin fekk, varð avgjørt at hava hoyringarfundir við teir partar, sum sendu svar inn, ið høvdu royndir við TGT.

Hesir eru: Autismufelagið, Almannaverkið, Sernám, Barna- og Ungdómspsykiatriin, Undirvísingarstýrið, Skúlin við Løgmannabreyt, Skúlin á Fløtum, Guli skúli, Skúlin á Giljanesi, Runavíkar kommunuskúli, Skúlin á Skúlatrøð, Námsfrøðiligir ráðgevar frá Klaksvíkar kommunu, Runavíkar kommunu, Tórshavnar kommunu, Dagstovnurin í Øksnagerði, Barnahúsið Sellin, Náttúrubarnagarðurin Sóljuhjarta, Dagstovnurin við Stórheygg, Gigni, Heilsutrygd, tveir kommunulæknar og Barnaverndartænasturnar í Vágum, Tórshavn og Klaksvík.

Samanlagt hevur arbeiðsbólkurin havt 10 hoyringarfundir eins og uppfylgjandi fundir við nakrar av pørtunum, í teimum førum har arbeiðsbólkurin metti tað neyðugt.

Hoyringarfundirnir vóru skipaðir soleiðis, at partarnir komu á fund fyri hvørt økið sær og varð tosað um svarini, sum tey høvdu sent arbeiðsbólkinum, soleiðis at møguleiki varð fyri at útgreina nøkur av svarunum og kundi arbeiðsbólkurin seta uppfylgjandi spurningar.

Arbeiðið byggir soleiðis á skrivlig svar og hoyringarfundir við luttøku frá Autismufelagnum,

Sí „Yvirlýsing um Samstarv um at fremja tilmælini í „Tí góðu tilgongdini“




Almannaverkinum, Sernám, Undirvísingarstýrinum, Barna- og Ungdómspsykiatriin, og Gigni, fýra kommunulæknum, 10 skúlum, 12 dagstovnum og dagrøktum, tveimum frítíðarskúlum, fimm barnaverndartænastum og trimum kommunalum námsfrøðiligum ráðgevingum.

Arbeiðsbólkurin hevur samlað og samanskrivað alt tilfarið, og út frá tí bólkað hetta eftir teimum evnum, ið vístu seg at vera umráðandi at lýsa og viðgera fyri at fáa eina nøktandi eftirmeting. Hetta tilfarið liggur til grundar fyri teimum tilmælum, ið arbeiðsbólkurin kom fram til.

Eitt uppskot av eftirmetingini var sent pørtunum, sum hava verið inni til hoyringarfund, til viðmerkingar, áðrenn eftirmetingin var endalig.

Arbeiðsbólkurin hevur, eftir tørvi, kunnað stýrisbólkin um gongdina við arbeiðinum.

Faldari:
Tann góða tilgongdin hjá foreldrum at børnum við
AUTISMU

# 6. Hvussu virkar Tann góða tilgongdin í dag?

Endamálið við Tí góðu tilgongdini (hereftir nevnt TGT), var at gera tað greitt fyri foreldrum, hvussu ymsu almennu skipanirnar virka og hvør veitir hvørja tænastu. Endamálið var ikki at hækka tænastustøði í hvørjum geira sær, men at samskipa og sjónliggera verandi tænastur, og harvið skapa realistiskar væntanir. Harumframt var endamálið at fyribyrgja, at foreldur at børnum við autismu skuldu ganga frá hurð til hurð fyri at fáa hjálp, við at skapa eitt forum, har øll, ið veita tænastu til barnið og familjuna, møtast og tænastan verður samskipað.

Sum greitt frá í broti *3. Arbeiðsleistur*, varð ein faldari, við heitinum *Tann góða tilgongdin hjá foreldrum at børnum við autismu*, gjørdur, ið lýsir avtalaða leistin, ið er ein vegleiðing til foreldur um innihaldið í TGT.

TGT varð sett í verk 1. januar 2015, og var hetta ein kærkomin hjálp hjá hesum familjum. TGT fekk eina jaliga umrøðu frá Autismufelagnum og í almenna rúminum. Foreldur greiddu millum annað frá, at áðrenn skipanin varð sett í verk, vóru almennu skipanirnar stirvnar. Myndugleikar arbeiddu ikki saman, og vistu ofta heldur ikki av hvørjum øðrum. Við árliga fundinum upplivdu foreldur, at tey loksins høvdu eitt stað at venda sær til og at tey tí ikki longur vórðu noydd at greiða frá teirra støðu fleiri ferðir, fyri at fáa hjálp. Harvið batnaði samstarvið um gerandisdagin hjá familjunum.

Upprunaliga var ætlanin, at skipanin skuldi eftirmetast í 2017. Hetta bleiv tó ikki veruleiki, hóast mett varð, at tørvur var á at gera hesa eftirmeting. Í fyrstu atløgu varð tí avgjørt at gera nakrar tillagingar í TGT, sum ein liður í at loysa nakrar avbjóðingar, áðrenn ein eftirmeting kundi gerast. Avgerðina um hesar tillagingar tók stýrisbólkurin fyri TGT tann 21. desember 2017. Hesar tillagingar framganga ikki av faldaranum.

Í hoyringartilgongdini gjørdist tað skjótt greitt fyri arbeiðsbólkinum, at umframt tær tillagingar, ið stýrisbólkurin tók avgerð um at fremja í 2017, so eru fleiri aðrar tillagingar gjørdar, síðani TGT varð íverksett. Sostatt er ikki samsvar ímillum mannagongdirnar, ið eru lýstar í faldaranum, og hvussu TGT virkar í dag. Talan er bæði um størri og smærri tillagingar, og eru flestu av hesum gjørdar, uttan at tær eru góðkendar ella umrøddar í stýrisbólkinum.

Í hesum broti verður gjørd ein lýsing av teimum broytingum og tillagingum, ið eru gjørdar síðani TGT varð sett á stovn. Hetta verður gjørt við at greiða frá tillagingunum, sum eru framdar í íverksetanartilgongdini, og við at samanbera faldaran, ið lýsir ætlaðu mannagongdina, og svarini frá hoyringarpørtunum, ið vísa veruleikan í dag.

## 6.1 Tillagingar í íverksetanartilgongdini

Tilmælið, um at skipa eina góða tilgongd hjá familjum við barni við autismu, ið varð handað avvarðandi landsstýrisfólkum og formanninum í kommunufelagnum í 2014, var útgangsstøðið fyri íverksetanini av TGT.

Við tað, at Almannaverkið fekk álagt samskipanarleiklutin, varð tað eisini Almannaverkið, ið stóð á odda fyri íverksetanini. Hetta skuldi gerast uttan at eyka játtan varð sett av til endamálið. Úrslitið varð, at størsti parturin av tilmælinum varð íverksettur uttan tillagingar. Tó vórðu nakrar tillagingar framdar, við tí fyri eyga at tryggja, at TGT kundi virka í praksis.

Tillagingarnar, sum vórðu gjørdar í íverksetanartilgongdini eru fylgjandi:

- Sambært tilmælinum skuldi samskiparin tryggja, at toymið um hvørt einstakt barn skuldi møtast eftir tørvi, og í minsta lagi einaferð um mánaðin. Almannaverkið metti ikki, at tað lat seg gera, at toymini møttust eftir tørvi, og tóku tí avgerð um, at toymið hevði fund einaferð um árið, tann mánaðin barnið hevði føðingardag.
- Fyri at starvsfólkaorkan í Almannaverkinum skuldi røkka til, varð avgjørt, at tíðspunktið fyri fundin skuldi taka útgangsstøði í foreldrunum, og at hinir partarnir máttu laga seg eftir hesum, og tí ikki kundu fáa fundin fluttan eftir teirra tørvi.
- Avgerðin um at tíðspunktið fyri fundin tók útgangsstøði í foreldrunum hevði við sær, at tað ikki varð gjørligt at hava eitt fast toymi um hvørt barnið sær. Tað var tí hvør stovnur sær, ið fekk innkalling til netfund, og síðani var tað upp til stovnin at tryggja, at tey sum møttu til fundin umboðandi teirra øki, kendu til barnið.

## 6.2 Tillagingar „Tá ábending er um autismu“

Fyrsti parturin av TGT við heitinum *Tá ið ábending er um autismu,* snýr seg um hvør mannagongdin er, frá tí at foreldur, ella onnur ið eru um barnið, varnast, at barnið ikki mennist sum onnur børn, og til staðfest er um barnið hevur autismu.

Í hesum broti vísir faldarin á fylgjandi mannagongd:

*Um barnið verður ansað heima, kunnu foreldur venda sær til heilsufrøðingin ella kommunulæknan um stúranina. Er barnið í ansingartilboði, kunnu foreldrini tosa við starvsfólkini um stúranina.*

*Heilsufrøðingurin, kommunulæknin ella starvsfólkini í barnaansingini gera síðani eina metan av støðuni. Hava tey somu stúran um menningina hjá barninum, skipa tey í samráð við foreldrini fyri, at barnið verður tilmeldað Sernámi. Í tilmeldingarskjalinum verða eygleiðingarnar hjá foreldrum og fakfólkum lýstar.*

*Eru starvsfólkini ikki samd við foreldrunum um, at orsøk er at vera stúrin um menningina hjá barninum, kunnu foreldur sjálvi venda sær beinleiðis til Sernám, við at útfylla tilmeldingarskjali á heimasíðuni, og senda tað til Sernám.*

*Sernám greinar síðani støðuna hjá barninum grundað á eygleiðingarnar hjá foreldrum, heilsufrøðingi, kommunulækna og starvsfólkum í barnaansingini. Tá støðan er greinað, vendir Sernám aftur til starvsfólkini í barnaansingini við ráðgeving, so námsfrøðin skjótast gjørligt verður tillagað barninum.*

*Meðan bíðað verður eftir, at autisma verður staðfest, bjóðar Sernám foreldrunum uppfylgingarsamrøður hjá sálarfrøðinginum, sum hevur málið hjá teirra barnið. Endamálið við samrøðunum er at hjálpa foreldrum at skilja og handfara truplu støðuna, tey tá eru í.*

*Vísir kanningin á Sernámi, at grundaður illgruni er um, at barnið hevur autismu, so skal staðfestast, um so er. Sernám vísir tá barninum til Psykiatriska depilin, sum ger serkanningar og kann áseta at talan er um autismu.*

*Áðrenn barnið verður ávíst til barna- og ungdómspsykiatriska toymið á Psykiatriska deplinum, skal tað til eina vanliga barnakanning hjá egnum kommunulækna. Ráðini eru, at barnið skal kannast fyri aðrar likamligar sjúkur, sum kunnu mistakast fyri autismu.“*

Samanumtikið vísa hoyringarsvarini frá pørtunum, at fleiri broytingar eru gjørdar í hesum partinum, síðani TGT varð sett í verk. Hesar broytingar eru ikki avtalaðar millum partarnar, og hava heldur ikki verið lagdar fyri stýrisbólkin.

Tá ið faldarin umrøður ansingartilboð í omanfyri standandi mannagongd, so hevur arbeiðsbólkurin mett, at hetta fevnir um bæði dagstovn og skúla, við tað at fleiri børn eru byrjaði í skúla, tá ið foreldur ella skúlin eru stúrin um menningina hjá barninum, og um talan kann vera um autismu.

### 6.2.1 Stúrin um barnið

Sambært hoyringarsvarunum frá Gigni, kommunulæknum, dagstovnum og skúlum, so er mannagongdin framvegis tann, at foreldur kunnu venda sær til hesi, um tey eru stúrin um menningina hjá barni teirra. Hesi gera síðani gera eina metan av støðuni, eins og faldarin vísur á. Ymiskt er tó, hvussu hesir stovnar handfara málið víðari.

Summir dagstovnar vísa í hesum sambandi á, at tað eisini javnan kemur fyri, at dagstovnurin vendir sær til foreldrini um teirra stúran, og at tilgongdin tí gongur báðar vegir.

Autismufelagið er av teirri fatan, at tað er ymiskt frá dagstovni til dagstovn, hvussu væl ílatin tey eru til at lofta stúranini hjá foreldrunum, og til at vita hvussu farast víðari skal fram í hesum førum. Hetta verður av felagnum mett at vera tongt at um dagstovnurin hevur nøktandi fakligar førleikar og arbeiðsorku á stovninum. Autismufelagið metir sum heild, at heilsufrøðingar, kommunulæknar og starvsfólk, ið eru um barnið, ofta hava lítla ella onga vitan um autismu, og ivast tí í um hesi hava vitan nokk til at gera eina meting av, um talan kundi verið um autismu, tá ið foreldur venda sær til teirra við stúranum um barnið.

### 6.2.2 Tilmelding til Sernám

Sambært faldaranum skulu heilsufrøðingurin, kommunulæknin og starvsfólkini, ið eru um barnið saman við foreldrunum skipa fyri, at barnið verður tilmeldað Sernámi, um tey hava somu stúran, sum foreldrini, um menningina hjá barninum. Hoyringarsvarini vísa tó, at henda mannagongd er broytt.

Gigni greiðir frá, at tey eru um familjurnar til barnið er 18 mánaðir, og møta síðani barninum aftur, tá ið barnið fer í skúla.

Um ábending er um at eitt barn ikki mennist sum tað skal, áðrenn barnið er 18 mánaðir, so ger heilsufrøðingurin eina meting av støðuni og vísir til kommunulæknan. Gigni vísir á, at tað ikki er ofta, at ábending um autismu verður staðfest so tíðliga, og tí er heilsufrøðingurin ofta ikki ein partur av hesum málum.

Gigni greiðir frá, at tey bjóða øllum børnum til eina viðtalu hjá heilsufrøðingi í sambandi við skúlabyrjan. Tá ið heilsufrøðingurin er stúrin um eitthvørt við einum barni í skúlaaldri, so er mannagongdin sambært Gigni tann, at heilsufrøðingurin setur seg í samband við foreldrini, og tosar síðani við flokslæraran um hetta, við samtykki frá foreldrunum. Fokus hjá heilsufrøðinginum er trivnaðurin hjá barninum, bæði í skúlanum og heima, ella um barnið ikki mennist sum tað skal. Heilsufrøðingurin hevur ofta eyka samrøður, og um tað er eitthvørt, sum heilsufrøðingurin metir skal kannast nærri, biðja tey foreldrini um at venda sær til kommunulæknan. Heilsufrøðingurin kann harumframt hjálpa familjunum at koma í samband við teir stovnar og tilboð sum tey meta eru best egnaði at hjálpa barninum og familjunum, í hvørjum einstøkum føri.

Heilsufrøðingar vísa vanliga ikki beinleiðis til Sernám, tí sambært Gigni er mannagongdin tann, at eitt slíkt samstarv skal skipast umvegis ein dagstovn ella ein skúla.

Kommunulæknarnir greiða frá, at teir ávísa ikki til Sernám, men beinleiðis til Barna- og ungdómspsykiatriina (hereftir B&U psykiatri), um teir meta, at ábending er um autismu.

Sernám vísir á, at mannagongdin í faldaranum viðvíkjandi tilmelding til Sernám partvís er galdandi, tá ið talan er um dagstovnar og skúlar, men at hon er tillagað nakað. Allir dagstovnar og skúlar hava nú fastar fundir við Sernám – sernámsfundir – og er tað á hesum fundum, tey fyrst skulu gera vart við, at

tey eru stúrin um menningina hjá einum barni. Eftir fundin verður støða tikin til, um dagstovnur/skúli, Sernám og foreldur skulu inn í eitt samstarv.

Inngongdin til Sernám er sostatt umvegis sernámsfundirnar. Um foreldur venda sær beinleiðis til Sernám um teirra stúran, biður Sernám tey venda sær til dagstovnin, skúlan ella kommunulæknan. Sernám greiðir tó frá, at tað av og á kemur fyri, at foreldur venda sær beinleiðis til Sernám, tí at ósemja er ímillum foreldrini og dagstovnin/skúlan. Í teimum førunum tekur Sernám hetta upp við stovnin, og eru tað tí dømir um einstøk mál, sum ikki byrja á dagstovninum/skúlanum. Um eitt barn hevur ein tørv og ikki er á dagstovni (vegna aldur og/ella vegna tørv), er tað føðideild/barnadeild, foreldur, Gigni, Barnaverndartænastur ella Almannaverk, sum seta seg í samband við Sernám fyri at fáa ráðgeving. Um barnið ikki gongur í skúla, kemur støðan undir „skúlafráveru". Tá er tað skúli, Undirvísingarstýrið ella foreldur, sum seta seg í samband við Sernám. Sernám fyriheldur seg tá til støðuna í hvørjum einstøkum føri.

Dagstovnar eru ymiskir á máli viðvíkjandi um teir venda sær til Sernám, tá ið teir eru stúrnir um menningina hjá barninum. Summir vísa á, at stúranin verður tikin upp á sernámsfundi við Sernám, aðrir siga seg í størri mun nýta námsfrøðiligu ráðgevingina hjá avvarðandi kommunu, meðan aðrir aftur siga seg ikki brúka Sernám, tí at teir ikki meta, at hjálpin Sernám veitir nøktar teirra tørv. Fleiri kommunalar námsfrøðiligar ráðgevingar vísa, eins og dagstovnarnir, á, at teirra fatan er, at dagstovnarnir ofta heldur ynskja at fáa ráðgeving frá teimum, og at hetta millum annað er orsakað av, at teir kenna børnini og starvsfólkini frammanundan.

Skúlarnar eru somuleiðis ymiskir á máli um, hvørt teir taka teirra stúran upp á sernámsfundinum, ella um teir í størri mun nýta førleikastovurnar ella heilsufrøðingin í skúlunum, tá ið teimum tørva ráðgeving. Eisini vísa bæði dagstovnar og skúlar á, at tað eru ov fáir sernámsfundir, og at tað tí ikki er gjørligt at viðgera øll mál, ið tørvur er á. Sernám viðmerkir í hesum sambandi, at tey eru greið yvir, at eftirspurningurin eftir sernámsfundum er stórur, og at tey ikki fáa nøkta henda tørv við verandi starvsfólkaorku og játtan.

Um starvsfólkini á dagstovni og skúla ikki eru samd við foreldrunum í, at orsøk er at vera stúrin um menningina hjá barninum, so er mannagongdin ikki longur, at foreldur kunnu venda sær beinleiðis til Sernám. Autismufelagið og Sernám greiða frá, at henda mannagongd er broytt, og at foreldur skulu venda sær til Sernám umvegis dagstovnin ella skúlan, ið síðani kunnu taka málið upp á sernámsfundunum. Sernám greiðir frá, at hetta er orsakað av, at tað er týdningarmikið og neyðugt, at dagstovnurin og skúlin eru við í tilgongdini, við tað, at Sernám ráðgevur dagstovnum og skúlum, og at tað er í tí samstarvinum, at foreldur kunnu fáa lut í ráðgevingin og vegleiðingini frá Sernámi. Flestu dagstovnar, frítíðarskúlar og skúlar greiða somuleiðis frá hesum, meðan nakrir ikki virka til at kenna til hesa mannagongd.

### 6.2.3 Ráðgeving til dagstovn og skúla

Sum sæst omanfyri er mannagongdin sambært faldaranum, at Sernám greinar støðuna hjá barninum grundað á eygleiðingarnar hjá foreldrum, heilsufrøðingi, kommunulækna og starvsfólkum í barnaansing og skúla. Síðani vendir Sernám aftur til dagstovnin og skúlan við ráðgeving, so námsfrøðin skjótast gjørligt verður tillagað barninum.

Sernám vísir í hoyringarsvarinum á, at Sernam ongantíð hevur fingið eygleiðingar frá heilsufrøðingi og kommunulækna. Mannagongdin er tí ikki broytt, við tað at mannagongdin í faldaranum ongantíð varð íverksett í praksis. Sernám greinar tørvin hjá dagstovni, skúla og barni, út frá vitan frá stovninum og foreldrum, umframt møguligum egnum eygleiðingum, og ráðgevur út frá hesum. Sernám vísir á, at hetta altíð hevur verið mannagongdin, og tí hevur mannagongdin í faldaranum hesum viðvíkjandi ongantíð verið praksis.

### 6.2.4 Uppfylgjandi samrøður hjá sálarfrøðingi

Hvørki Autismufelagið, dagstovnar, skúlar ella

kommunala námsfrøðiliga ráðgevingin siga seg kenna til, at Sernám bjóðar foreldrum uppfylgjandi samrøður hjá sálarfrøðingum, sum hevur málið hjá teirra barnið, meðan bíðað verður eftir um staðfest verður, at barnið hevur autismu.

Sernám greiðir frá, at tá ið tey gera samstarvsavtalu við ein dagstovn ella skúla og foreldur, um eitt ávíst barn, so er hetta ikki tongt at um barnið er ávíst til útgreinan fyri autismu, men heldur at tørvinum hjá barninum og stovninum, og í hvønn mun Sernám fær vegleitt ella ráðgivið hesum viðvíkjandi. Hendan ráðgeving og vegleiðing kann tá bæði gevast til stovnin og foreldrini saman, ella hvør sær. Talan kann tí vera um uppfylgjandi samrøður við ein sálarfrøðing í Sernám, men hetta er ikki føst mannagongd fyri øll børn ið eru ávíst til útgreining, og er tí ikki í tráð við faldaran.

### 6.2.5 Ávísing til B&U psykiatri

Sambært faldaranum skal Sernám vísa barnið til Psykiatriska depilin, um teirra kanningar vísa, at grundaður illgruni er um autismu. Hendan mannagongdin var galdandi, tá ið TGT tók við, men í desember 2021 boðaði Sernám frá, at tey hava broytt mannagongd á hesum øki.

Sernám greiðir í hoyringarsvarinum frá, at mannagongdin í dag er, at tey gera ymiskar kanningar, sum taka útgangsstøði í tørvinum hjá barninum, tá ið mett verður, um hesar kanningar eru viðkomandi. Um illgruni er um diagnosu, so verður hesin illgruni tikin upp við foreldrini, og tann vitanin, sum nú er hjá Sernám, kunnu foreldur hava við sær til kommunulæknan. Sernám ger ikki longur beinleiðis ávísingar til B&U psykiatriina, men bæði kommunulæknin og B&U psykiatriin hava altíð møguleika fyri at fáa avrit av viðkomandi skjølum hjá Sernámi, við samtykki frá foreldrunum.

Autismufelagið, B&U psykiatri, kommunulæknar, skúlar, dagstovnar, frítíðarskúlar, kommunala námsfrøðiliga ráðgevingin og barnaverndartænasturnar vísa øll á, at um ábending er um autismu er mannagongdin í dag, at foreldur skulu venda sær til kommunulæknan. Fleiri skúlar, dagstovnar, kommunalar námsfrøðiligar ráðgevingar og barnaverndartænastur vísa somuleiðis á, at tey í hesum sambandi bjóða foreldrunum at fáa viðkomandi tilfar, ið lýsir støðuna og barnið, við til kommunulæknan. Harvið vísa hoyringarsvarini, at allir partar eru greiðir yvir, at mannagongdin í dag er, at kommunulæknin er einasti myndugleiki, sum ávísir børnum til B&U psykiatriina.

### 6.2.6 Barnakanning hjá kommunulækna

Seinasta liðið í hesum partinum er sambært faldaranum, at barnið skal til eina vanliga barnakanning hjá egnum kommunulækna, áðrenn barnið verður ávíst til B&U psykiatri. Ráðini eru, at barnið skal kannast fyri aðrar likamligar sjúkur, sum kunnu misfatast fyri autismu.

Kommunulæknarnir siga í hesum sambandi, at kommunulæknin ger innleiðandi heildarkanningar av heilsuni hjá barninum sum heild og at serlig áherðsla verður løgd á sálarheilsulig og sosialheilsulig viðurskifti, eins og at øll innheintan av upplýsingum í mun til útgreinan, nú liggur hjá kommunulæknunum.

B&U psykiatriin greiður harumframt frá, at kommunulæknin ger í dag eina vanliga barnakanning í sambandi við ávísing, og tá ið barnið er ávíst til B&U psykiatri, biðja tey barnalækna gera nærri kanningar, um tey meta at hetta er neyðugt. Harumframt biðja tey um kanning av hoyrn og sjón, um tey meta at hetta er viðkomandi.

Autismufelagið greiðir í hoyringarsvari teirra frá, at felagið ikki veit um henda mannagongd verður fylgd.

Hoyringarsvarini vísa sostatt, at sambært kommunulæknunum og B&U psykiatriini verður henda mannagongd fylgd. Tó bendir svarið frá Autismufelagnum á manglandi kunning hesum viðvíkjandi.

### 6.2.7 Samanumtøka

Við støði í omanfyristandandi kann arbeiðsbólkurin staðfesta, at fylgjandi broytingar eru framdar í TGT „tá ið ábending er um autismu“:

## Tann góða tilgongdin – Tá ið ábending er um autismu

| Mannagongd faldarin | Mannagongd í dag | Er broytingin avtalað millum partarnar ella góðkend í stýrisbólkinum? |
|---|---|---|
| Um barnið verður ansað heima, kunnu foreldur venda sær til heilsufrøðingin ella kommunulæknan um stúranina. Er barnið í ansingartilboðið, kunnu foreldrini tosa við starvsfólkini um stúranina. | Um barnið verður ansað heima, kunnu foreldur venda sær til heilsufrøðingin ella kommunulæknan um stúranina. Er barnið á dagstovni ella í skúla, kunnu foreldrini tosa við starvsfólkini um stúranina. | Mannagongdin er óbroytt. |
| Heilsufrøðingurin, kommunulæknin ella starvsfólkini í barnaansingini gera síðani eina metan av støðuni. Hava tey somu stúran um menningina hjá barninum, skipa tey í samráð við foreldrini fyri, at barnið verður tilmeldað Sernámi. Í tilmeldingarskjalinum verða eygleiðingarnar hjá foreldrum og fakfólkum lýstar. | Heilsufrøðingurin, kommunulæknin ella starvsfólkini í barnaansingini gera síðani eina metan av støðuni. Hava tey somu stúran um menningina hjá barninum, **ávísir Heilsufrøðingurin til kommunulæknan, og kommunulæknin til Psykiatriska depilin. Í samráði við foreldrini venda dagstovnurin og skúlin venda sær til kommunalu námsfrøðiligu ráðgevingina/førleikastovuna og/ella Sernám umvegis sernámsfundirnar.** | Nei. |
| Eru starvsfólkini ikki samd við foreldrunum um, at orsøk er at vera stúrin um menningina hjá barninum, kunnu foreldur sjálvi venda sær beinleiðis til Sernám, við at útfylla tilmeldingarskjalið á heimasíðuni, og senda tað til Sernám. | Eru starvsfólkini ikki samd við foreldrunum um, at orsøk er at vera stúrin um menningina hjá barninum, **og foreldrini venda sær til Sernám við síni stúran, so tekur Sernám málið upp við dagstovnin ella skúlan. Um starvsfólkini framvegis ikki eru samd kunnu starvsfólkini fáa eina „generella ráðgeving" um autismu frá Sernám.** | Nei. |
| Sernám greinar síðani støðuna hjá barninum grunda á eygleiðingarnar hjá foreldrum, heilsufrøðingi, kommunulækna og starvsfólkum í barnaansingini. Tá støðan er greinað, vendir Sernám aftur til starvsfólkini í barnaansingini við ráðgeving, so námsfrøðin skjótast gjørligt verður tillagað barninum. | Sernám greinar síðani støðuna hjá barninum **grunda á eygleiðingarnar hjá foreldrum, dagstovninum/skúlanum og møguliga egnum eygleiðingum.** Tá støðan er greinað, vendir Sernám aftur til starvsfólkini við ráðgeving, so námsfrøðin skjótast gjørligt verður tillagað barninum. | Sernám hevur ongantíð fingið eygleiðingar frá heilsufrøðingi og kommunulækna. Mannagongdin er tí ikki broytt, við tað at mannagongdin í faldaranum ongantíð var íverksett í praksis. |
| Meðan bíðað verður eftir, at autisma verður staðfest, bjóðar Sernám foreldrunum uppfylgingarsamrøður hjá sálarfrøðinginum, sum hevur málið hjá teirra barnið. Endamálið við samrøðunum er at hjálpa foreldrum at skilja og handfara truplu støðuna, tey tá eru í. | Hetta er ikki føst mannagongd fyri øll børn ið eru ávíst til útgreining, og er tí ikki í tráð við faldaran. | Nei. |
| Vísir kanningin á Sernámi, at grundaður illgruni er um, at barnið hevur autismu, so skal staðfestast, um so er. Sernám vísir tá barninum til Psykiatriska depilin, sum ger serkanningar og kann áseta at talan er um autismu. | Um Heilsufrøðingurin, Sernám, Barnaverndartænastan ella starvsfólk, ið eru um barnið í dagligdegnum meta, at illgruni er um, at barnið hevur autismu, so biðja tey foreldrini venda sær til kommunulæknan. Um hesi hava skjøl um barnið geva tey foreldrunum hesi at hava við til kommunulæknin. Kommunulæknin ger síðani av um barnið verður ávíst til Psykiatriska depilin, sum ger serkanningar og kann staðfesta um talan er um autismu. | Nei. |
| Áðrenn barnið verður ávíst til barna- og ungdómsprykiatriska toymið á Psykiatriska deplinum, skal tað til eina vanliga barnakanning hjá egnum kommunulækna. Ráðini eru, at barnið skal kannast fyri aðrar likamligar sjúkur, sum kunnu misfatast fyri autismu. | Áðrenn barnið verður ávíst til barna- og ungdómsprykiatriska toymið á Psykiatriska deplinum, skal tað til eina vanliga barnakanning hjá egnum kommunulækna. Ráðini eru, at barnið skal kannast fyri aðrar likamligar sjúkur, sum kunnu misfatast fyri autismu. | Mannagongdin er óbroytt. |

## 6.3 Tillagingar „Tá autisma er staðfest“

Næsti partur av TGT við heitinum „Tá autisma er staðfest“ snýr seg um, hvat TGT inniber, tá ið barnið hevur fingið staðfest autismu, hvat familjan kann vænta av TGT og hvussu tænasturnar frá ymisku geirunum verða samskipaðar.



Í hesum broti vísir faldarin á fylgjandi mannagongd:

*Tá autisma er staðfest, fáa foreldrini undirvísing á Psykiatriska deplinum, saman við øðrum foreldrum. Endamálið er at læra at skilja, hvat autisma er.*

*Eitt tvørgeiraligt toymi við einum samskipara verður skipað til hvørt barn. Toymið verður mannað við foreldrunum og umboðum fyri hvørt av hesum økjum: almannaøkinum, heilsuøkinum, námsfrøðini og sernámsfrøðini. Psykiatriski depilin, Sernám og Almannaverkið luttaka í øllum toymum, men annars verður toymið sett saman alt eftir støðuni hjá ávísa barninum.*

*Ein av toymislimunum, oftast umboðið frá Almannaverkinum, verður samskipari hjá familjuni.*

*Toymið hevur fund einaferð árliga og annars, tá tørvur er.*

*Psykiatriski depilin innkallar til fyrsta fund í toyminum. Seinni er tað samskiparin, sum fyriskipar toymisfundir.*

*Í gerandisdegnum samskifta foreldrini við tey starvsfólk, sum eru um barnið. Men, hava foreldur tørv á at koma í samband við toymið, skulu tey venda sær til samskiparan.*

*Toymið ger eina virkisætlan fyri barnið, grundað á tørvin hjá barninum og ynskini hjá barninum og foreldrunum. Allir toymislimir semjast um ætlanina, og soleiðis verða útlitini og gongdin greið, og øll kenna sína uppgávu og ábyrgd. Øll hugsandi ivamál skulu viðgerðast í toyminum, og støða skal takast til bestu loysn. Virkisætlanin verður dagførd á hvørjum toymisfundi.*

*Er tørvur á kreppuhjálp eftir at autisman er staðfest, skal kommunulæknin ávísa foreldrum og barnið til viðgerð hjá privatstarvandi sálarfrøðingi. Hendan kreppuhjálp verður goldin partvíst við gjaldi frá Heilsutrygd, og foreldur kunnu søkja Almannaverkið um gjald av egingjaldinum.*

*Samskiparin er oftast eisini sosialráðgevi teirra í Almannaverkinum. Hesin veitir teimum ráðgeving um møguleikarnar fyri fíggjarligum stuðli eftir almannalógini. Somuleiðis veitir samskiparin ráðgeving um møguligar tænastur eftir almannalógini.*

Svarini frá hoyringarpørtunum vísa, at tillagingar eru gjørdar í hesum partinum. Onkur tillaging er góðkend í stýrisbólkinum, meðan aðrar tillagingar hvørki eru avtalaðar millum partarnar ella góðkendar av stýrisbólkinum.

### 6.3.1 Undirvísing til foreldur

Sambært Almannaverkinum, B&U psykiatriini og Autismufelagnum verða foreldur ikki longur undirvíst í autismu á Psykiatriska deplinum, við tað, at hendan uppgáva verður lyft av Heimaráðgevingini hjá Almannaverkinum. Víst verður á, at ein samstarvsavtala varð gjørd millum Almannaverkið og B&U psykiatriina um hetta, fyri at tilboðið ikki skuldi verða bjóðað í tveimum geirum. Sostatt kann staðfestast, at henda mannagongd er broytt, soleiðis at undirvísingin er flutt til Almannaverkið.

### 6.3.2 Eitt toymi

Sum útgangsstøði eru allir partar samdir um, at mannagongdin framvegis er tann, at eitt toymi verður skipað til hvørt barnið, men í mun til hvør luttekur í hesum toyminum, so er mannagongdin broytt. Sum víst á omanfyri varð tað í íverksetanartilgongdini avgjørt, at tað ikki skuldi vera eitt fast toymi um barnið, men at umboð frá teimum ymisku stovnunum, sum kenna barnið, skuldu luttaka á fundinum (sí pkt. 5.1). Sostatt er tað upp til hvønn einstaka stovn at tryggja, at viðkomandi umboð luttaka á fundinum.

Faldarin ásetur, at umframt foreldur, so luttaka Psykiatriski depilin, Sernám og Almannaverkið í øllum toymum, og at toymið annars verður sett saman alt eftir støðuni hjá ávísa barninum.

Hendan mannagongd er broytt soleiðis, at frá 1. januar 2018 luttekur B&U psykiatriin bert á tí fyrsta fundinum og ikki á seinni fundum, uttan so, at talan er um, at barnið hevur fleiri diagnosur (komorbiditet). Hendan broyting í mannagongdini er umrødd og góðkend av stýrisbólkinum.

Sostatt varð mannagongdin eftir 1. januar 2018, at tað bert eru Sernám og Almannaverkið, ið eru fastir limir í øllum toymum.

Almannaverkið er samskipari, og luttekur á øllum TGT-fundum og førir sambært avtaluni støðufrágreiðingar hálvárliga yvir fundarluttøku, sum síðani verður send avvarðandi stjórnarráði.

Viðvíkjandi luttøku frá Sernám vísa støðufrágreiðingarnar frá 2021 og 2022, at Sernám luttók á áleið 60% av fundunum í TGT, sum tey fingu innbjóðing til, hetta tíðarskeiðið. Sernám greiðir í hoyringartilgongdini frá, at hetta bæði er orsakað av manglandi starvsfólkaorku, og tí, at tað eru fleiri fundir um børn, ið ikki eru eitt aktivt mál hjá Sernámi. Sernám raðfestir fundir í TGT í mun til, um barnið talan er um, er eitt aktivt mál ella ikki, og merkir hetta, at um Sernám er inni yvir barnið, so luttaka tey á fundi. Í teimum førum, at einki aktivt mál um barnið er í Sernám, metur Sernám, at tey ongan leiklut hava á fundinum, og hava tey tá í fleiri førum valt at raðfesta teirra starvsfólkaorku til teirra høvuðsuppgávu, ið er at ráðgeva skúlum og dagstovnum í mun til autismu og aðrar spurningar. Sernám upplýsir at fleiri dømir eru tó um, at Sernám luttekur hóast barnið ikki hevur eitt aktivt mál hjá teimum, til dømis um skúlin ynskir hetta og avtalað er, millum skúlan og Sernám, um at fara í eitt samstarv um støðuna. Tá ið Sernám hevur fingið innbjóðing til fund, ið tey ikki luttaka á, kunna tey dagstovnin ella skúlan um hetta, og kunna tey samstundis um, at tey altíð kunnu venda sær til Sernám fyri at fáa ráðgeving.

Almannaverkið er av teirri fatan, at skal endamálið við einum TGT fundi røkkast, so má Almannaverkið, saman við Sernám, luttaka á øllum fundum, eins og TGT avtalan ásetur. Almannaverkið metir, at fundir uttan luttøku frá Sernám, kunnu hava karakter av at vera ein foreldrafundur millum skúla og heim, har samskiparin situr sum skrivari. Mett verður millum annað, at Sernám hevur ein avgerandi leiklut í mun til skúlatilboðið, og at tað ofta er har, avbjóðingarnar eru í gerandisdegnum. Harumframt

vísir Almannaverkið á, at avtalan um TGT ásetur at Almannaverkið og Sernám luttaka á øllum fundum. Ongin broyting er avtalað millum partarnar ella góðkend av stýrisbólkinum um at hetta er broytt, ella skal broytast. Orsakað av hesum tók Almannaverkið avgerð um, at frá 1. oktober 2022 verða fundir í TGT avlýstir, um Sernám ikki fær møtt, og familjan fær bjóðað fund aftur í komandi ári.

Sostatt er mannagongdin í dag, at fundir bert vera hildnir, um Sernám boðar frá luttøku. Undantiknir eru seinastu fundirnir í TGT, ið vera hildnir áðrenn barnið fyllir 18 ár, har vaksnamannatilveran verður umrødd. Í teimum førum hevur Almannaverkið valt at halda fast við at halda fundirnar, við tað at mett verður at Sernám hevur lítlan til ongan leiklut á hesum fundum.

Viðvíkjandi at Almannaverkið og Sernám eru fastir limir í TGT, og at toymið annars verður sett saman alt eftir støðuni hjá ávísa barninum, so er mannagongdin í dag tann, at samskiparin á hvørjum ári setir seg í samband við foreldrini, og avtalar nær fundurin skal vera hildin. Tað er í samrøðuni við foreldrini, at avtalað verður hvørjir partar eru viðkomandi fyri fundin. Sostatt verður toymið, til hvønn einstakan fund, framvegis sett saman, alt eftir støðuni hjá ávísa barninum.

### 6.3.3 Innkalling til fundir

Tann fyrsti fundurin, sum verður hildin í TGT, verður altíð hildin úti á Familjudeplinum á Landssjúkrahúsinum. Tað er B&U psykiatriin, sum kallar inn til fund, og avger hvør fær fundarinnkalling í hvørjum einstøkum føri, í samráð við foreldrini. Fundarinnkallingin verður send uml. 3-4 vikur áðrenn fundin og allir partar møta væl upp. Á fundinum fáa foreldrini møguleika at møta teimum fólkunum, sum hava og koma at hava ein leiklut í lívinum hjá barninum. Umframt at teir partar, sum ikki hava fingið útgreiningina, fáa diagnosuna hjá barninum at vita.

Viðvíkjandi innkalling til eftirfylgjandi fundirnar, so er mannagongdin í Almannaverkinum tann, at Almannaverkið setur seg í samband við foreldrini 6 vikur áðrenn føðingardagin hjá barninum, fyri at vita um tey ynskja fundin. Tíðspunktið verður avtalað við foreldrini í hesi samrøðuni, eins og hvørjir partar skulu vera við til fundin. Dagstovnar, skúlar, Sernám, Heimaráðgevingin hjá Almannaverkinum, barnaverndartænasturnar og B&U psykiatriin fáa innbjóðing sendandi frá samskiparanum, í teimum førum, at tey eru viðkomandi fyri fundin. Í innbjóðingini stendur, at um skúlin hevur samband við Gigni, kunnu tey bjóða umboð frá teimum við til fundin. Dagstovnar kunnu eisini bjóða kommunalu námsfrøðiligu ráðgevingini við, í teimum førum teir meta tað viðkomandi, hóast hetta ikki framgongur av fundarinnbjóðingini. Tó má endamálið, at fundarluttakararnir kenna og hava sæð barnið, ikki hvørva.

Harvið kunnu skúlarnir og dagstovnar víðarisenda fundarinnkallingina til Gigni ella kommunalu námsfrøðiligu ráðgevingina, ynskja tey luttøku av teimum á fundinum. Um foreldrini ynskja, at onnur enn omanfyri standandi skulu luttaka á fundinum, kunnu tey bjóða hesum við beinleiðis.

Hoyringarsvarini vísa sostatt at mannagongdin framvegis er, at B&U psykiatriin innkallar til fyrsta fundin, og at samskiparin innkallar til eftirfylgjandi fundir.

### 6.3.4 Samskiparin og árligi fundurin

Mannagongdin sambært faldaranum leggur upp til, at tað er umboðið hjá Almannaverkinum, sum er samskipari hjá familjunum og vísa hoyringarsvarini, at tað altíð er Almannaverkið, sum hevur henda leiklut. Almannaverkið viðmerkir, at tað er ein sosialráðgevi frá deildini Børn og Ung í Almannaverkinum, sum verður samskipari hjá familjuni. Tað er eisini samskiparin, sum kallar inn til árliga fundin í toyminum.

Sum greitt frá í broti 5.3.2, ger Almannaverkið hálvárligar støðulýsingar. Almannaverkið miðar ímóti at kalla inn til fundar í øllum málum, tann mánaðin barnið hevur føðingardag, men vísir á, at tað ikki altíð hevur eydnast teimum, at røkka hesum máli, síðani TGT bleiv sett á stovn í 2015. Hetta er m.a. orsakað av skifti í starvsfólkahópinum og avmarkingarnar, sum vóru undir koronufarsóttini.

Eisini verður víst á, at tað kemur fyri, at allir partar ikki møta til fundirnar.

Flestu partar vísa annars á, at tað ikki er lætt at fáa fund eftir tørvi, men at hildið verður fast í, at fundur er einaferð árliga.

Øll børn við autismu hava ein fastan sosialráðgeva í deildini Børn og ung í Almannaverkinum. Mannagongdin við at tað oftast er sosialráðgevin hjá familjuni, sum eisini er samskiparin í TGT, verður fylgd. Foreldur verða boðin til eina ráð- og vegleiðingarsamrøðu í Almannaverkinum, áleið 14 dagar eftir fyrsta fundin í B&U psykiatriini. Autismufelagið vísir á, at hetta er mannagongdin, men at tey uppliva, at tað kann verða ymist, hvussu væl foreldur verða kunnaði/ráðgivin um tað, tey kunnu søkja um. Ein partur vísir á, at tey uppliva, at samskiparin kunnar á fundinum um, hvat familjan kann søkja av ymiskum, men at tað ikki er vist, at tey fáa hjálpina, orsakað av bíðilista ella øðrum.

Sernám vísir í hesum sambandi á, at tað hevði verið ynskiligt, at samskiparin eisini hevur kunnleika til, hvussu aðrar skipanir arbeiða og kann vegleiða um hetta. Hetta fyri at samskiparin kann svara ymiskum spurningum frá foreldrum, so at teimum ikki nýtist at kontakta allar aðrar skipanir.

Samanumtikið kann staðfestast, at mannagongdin við einum samskipara og einum árligum fundi verður fylgd, men at tað er torført at fáa fleiri fundir enn tann eina. Harumframt verður mannagongdin, at samskiparin veitir ráðgeving um teirra møguleikar sambært lógini um almannatrygd og tænastur eisini fylgd.

### 6.3.5 Virkisætlan

Sambært pørtunum verður ein virkisætlan gjørd fyri hvørt barn sær, tó vísir onkur partur á, at tey ikki hava verið við til at gera eina virkisætlan fyri barnið og tað kemur fyri, at tey ikki fáa hana sendandi. Almannaverkið viðmerkir, at virkisætlanirnar vera gjørdar á sjálvum fundinum, í hvørjum einstøkum føri, og tí má talan vera um, at tað ikki hevur verið nóg greitt tilskilað, at talan er um eina virkisætlan.

Autismufelagið vísir á, at hóast ein virkisætlan er gjørd og avtalur verða gjørdar á fundinum, so eru tað ofta foreldrini sjálvi, sum mugu fylgja við um tað, sum er avtalað, verður gjørt. Aðrir partar vísa á, at tað kemur fyri, at man tosar um tað sama árið eftir og einki er hent. T.d. vísir kommunala námsfrøðiliga ráðgevingin á, at ofta ber fundurin brá av, at talan bara er um kunning, hvat hvør ger og hvørjar ætlanir eru fyri framtíðina, men tað verður ikki viðgjørt hvør loysn er best.

Sernám vísir á, at tað hevur víst seg, at í virkisætlanini verða uppgávur lagdar til Sernám, sum avtala ikki er gjørd um. Hetta er bæði tá Sernám hevur verið á fundi og har eingin frá Sernám luttók.

### 6.3.6 Samskifti í gerandisdegnum

Allir partar eru samdir um, at foreldrini samskifta við tey starvsfólk, sum eru um barnið í gerandisdegnum, men fleiri partar vísa á, at tey ikki vita um foreldrini venda sær til samskiparan, fyri at koma í samband við toymið. Mannagongdin er framvegis tann, at foreldur kunnu venda sær til samskiparan, fyri at koma í samband við toymið. Almannaverkið vísir tó á, at tað er sjáldan, foreldur venda sær til samskiparan, fyri at koma í samband við toymið, uttan um árliga fundin.

### 6.3.7 Kreppuhjálp

Autismufelagið greiðir frá, at tey vita at tað er ein møguleiki, at fáa sálarfrøðiliga viðgerð partvíst goldna av Heilsutrygd og at foreldur kunnu søkja Almannaverkið um egingjaldið, men duga ikki at siga, um foreldur verða nóg væl kunnaði um hesa mannagongd. Almannaverkið greiðir frá, at foreldur fáa stuðul eftir lógini um almannatrygd og tænastur til sálarfrøðiligar viðtalur. Almannaverkið vísir eisini á, at tey uppliva, at tað er trupult hjá foreldrunum, at sleppa til viðgerð og at tað er ein ávís bíðitíð.

### 6.3.8 Samanumtøka

Við støði í omanfyristandandi kann arbeiðsbólkurin staðfesta, at fylgjandi broytingar eru framdar í TGT „tá autisma er staðfest“:

## Tann góða tilgongdin – Tá autisma er staðfest

| Mannagongd faldarin | Mannagongd í dag | Er broytingin avtalað millum partarnar ella góðkend í stýrisbólkinum? |
|---|---|---|
| Tá autisma er staðfest, fáa foreldrini undirvísing á Psykiatriska deplinum, saman við øðrum foreldrum. Endamálið er at læra at skilja, hvat autisma er. | Tá autisma er staðfest, **fáa foreldrini undirvísing í Almannaverkinum,** saman við øðrum foreldrum. Endamálið er at læra at skilja hvat autisma er. | Avtalan er gjørd millum Almannaverkið og B&U psykiatriina. |
| Eitt tvørgeiraligt toymi við einum samskipara verður skipað til hvørt barn. Toymið verður mannað við foreldrunum og umboðum fyri hvørt av hesum økjum: almannaøkinum, heilsuøkinum, námsfrøðini og sernámsfrøðini. Psykiatriski depilin, Sernám og Almannaverkið luttaka í øllum toymum, men annars verður toymið sett saman alt eftir støðuni hjá ávísa barninum. | Eitt tvørgeiraligt toymi við einum samskipara verður skipað til hvørt barn. Toymið verður mannað við foreldrunum og umboðum fyri hvørt av hesum økjum: almannaøkinum, heilsuøkinum, námsfrøðini og sernámsfrøðini. **Sernám og Almannaverkið luttaka í øllum toymum,** men annars verður toymið sett saman alt eftir støðuni hjá ávísa barninum. **Fundir vera bert hildnir um Sernám boðar frá luttøku. Undantikið er seinasti fundur í TGT í sambandi við barnið fyllir 18 ár. B&U psykiatriin luttekur bert á fyrsta fundinum. Er talan um komorbiditet kann B&U paykiatriin luttaka á eftirfylgjandi TGT fundum.** | Broytingin um at Sernám ikki luttekur á øllum fundum og at fundir bert verða hildnir um Sernám luttekur er ikki avtalað millum partarnar ella góðkend í stýrisbólkinum.<br><br>Broytingin viðvíkjandi nær B&U psykiatriin luttekur hevur verið galdandi frá 1. januar 2018 og er góðkend av stýrisbólkinum. |
| Ein av toymislimunum, oftast umboðið frá Almannaverkinum, verður samskipari hjá familjuni. | Ein sosialráðgevi hjá Almannaverkinum er altíð samskipari hjá familjuni. | Broytt í mun til faldaran, men henda broyting kom við íverksetanini av TGT. |
| Toymið hevur fund einaferð árliga og annars, tá tørvur er. | **Um barnið frammanundan er eitt aktivt mál hjá Sernámi** hevur toymið fund einaferð árliga og annars, tá tørvur er. | Sum so óbroytt, men víst verður á, at tað ikki kemur fyri at fundur er eftir tørvi Sí annars omanfyri um aktiv mál hjá Sernám. |
| Psykiatriski depilin innkallar til fyrsta fund í toyminum. Seinni er tað samskiparin, sum fyriskipar toymisfundir. | Psykiatriski depilin innkallar til fyrsta fund í toyminum. Seinni er tað samskiparin, sum fyriskipar toymisfundir. | Mannagongdin er óbroytt. |
| Í gerandisdegnum samskifta foreldrini við tey starvsfólk, sum eru um barnið. Men, hava foreldur tørv á at koma í samband við toymið, skulu tey venda sær til samskiparan. | Í gerandisdegnum samskifta foreldrini við tey starvsfólk, sum eru um barnið. Men, hava foreldur tørv á at koma í samband við toymið, skulu tey venda sær til samskiparan. | Mannagongdin er óbroytt. |
| Toymið ger eina virkisætlan fyri barnið, grundað á tørvin hjá barninum og ynskini hjá barninum og foreldrunum. Allir toymislimir semjast um ætlanina, og soleiðis verða útlitini og gongdin greið, og øll kenna sína uppgávu og ábyrgd. Øll hugsandi ivamál skulu viðgerðast í toyminum, og støða skal takast til bestu loysn. Virkisætlanin verður dagførd á hvørjum toymisfundi. | Toymið ger eina virkisætlan fyri barnið, grundað á tørvin hjá barninum og ynskini hjá barninum og foreldrunum. Allir toymislimir semjast umw ætlanina, og soleiðis verða útlitini og gongdin greið, og øll kenna sína uppgávu og ábyrgd. Øll hugsandi ivamál skulu viðgerðast í toyminum, og støða skal takast til bestu loysn. Virkisætlanin verður dagførd á hvørjum toymisfundi. | Mannagongdin er óbroytt. |
| Er tørvur á kreppuhjálp eftir at autisman er staðfest, skal kommunulæknin ávísa foreldrum og barnið til viðgerð hjá privatstarvandi sálarfrøðingi. Hendan kreppuhjálp verður goldin partvíst við gjaldi frá Heilsutrygd, og foreldur kunnu søkja Almannaverkið um gjald av egingjaldinum. | Er tørvur á kreppuhjálp eftir at autisman er staðfest, skal kommunulæknin ávísa foreldrum og barnið til viðgerð hjá privatstarvandi sálarfrøðingi. Hendan kreppuhjálp verður goldin partvíst við gjaldi frá Heilsutrygd, og foreldur kunnu søkja Almannaverkið um gjald av egingjaldinum. | Mannagongdin er óbroytt. |
| Samskiparin er oftast eisini sosialráðgevi teirra í Almannaverkinum. Hesin veitir teimum ráðgeving um møguleikarnar fyri fíggjarligum stuðli eftir almannalógini. Somuleiðis veitir samskiparin ráðgeving um møguligar tænastur eftir almannalógini. | Samskiparin er eisini sosialráðgevi teirra í Almannaverkinum. Hesin veitir teimum ráðgeving um møguleikarnar fyri fíggjarligum stuðli eftir almannalógini. Somuleiðis veitir samskiparin ráðgeving um møguligar tænastur eftir almannalógini. | Í íverksetanar- tilgongdini bleiv tað Almannaverkið, sum fekk samskiparaleiklutin, tí hevur tað alla tíðina verið sosialráðgevin hjá familjunum, sum er samskipari. Tað var sostatt ikki samsvar í millum faldaran og praksis. |

## 6.4 Tillagingar "Tá barnið fer í skúla"

Triði partur av TGT við heitinum „Tá barnið fer í skúla" snýr seg um, hvussu alt verður skipað, tá ið barnið fer í skúla, hvat skúlatilboð er best hóskandi og hvussu skiftið frá dagstovni til skúla verður skipað.

Í hesum broti vísir faldarin á fylgjandi mannagongd:

> *Sernám ger eina støðumeting av barninum í sambandi við skúlabyrjan.*
>
> *Spurningurin, hvat skúlatilboð er best hóskandi fyri ávísa barnið, verður viðgjørdur í tvørgeiraliga toyminum, tá barnið er um 5 ár. Ivamálini kunnu vera fleiri, og avgerðir hesum viðvíkjandi verða eftirmettar í toyminum, sum barnið mennist og broytist.*
>
> *Øll børn við autismu fáa eitt skipað skifti frá dagstovni til skúla/forskúla. Dagstovnurin og kommunan skulu kunna skúlan um støðuna hjá barninum í góðari tíð áðrenn skúlabyrjan. Kunningin verður gjørd í samráð við Sernám.*

### 6.4.1 Støðumeting í sambandi við skúlabyrjan

Sernám vísir á, at um, ella tá, stúran er um skúlagongd, so eru tey ein partur av tilgongdini til skúlabyrjan, og gera eisini støðumetingar í hesum sambandi. Hetta er sum heild ikki tongt at um diagnosa er staðfest. Ráðgevingin hjá Sernám fer fram í samstarvi við dagstovn og foreldur og byggir á teirra vitan um barnið. Skúli og frítíðarskúli gerast partur av tilgongdini seinni.

Autismufelagið vísir á, at samanumtikið ger Sernám hesar støðumetingar og visiterar til t.d. bæði serskúlatilboð og serflokkar, um tey meta tað vera tað rætta fyri barnið. Tó metir Autismufelagið,at har eru avbjóðingar við mannagongdunum. Autismufelagið hevur eina fatan av, at Sernám ikki hevur fult yvirlit yvir tey børn, sum hava autismu og sum skulu byrja í skúla. Tað virkar sum um, at børnini skjótt detta niðurímillum, serliga, tá ið Sernám ikki er inn yvir í barnagarðinum og ikki møtir á netfundum.

### 6.4.2 Hóskandi skúlatilboð

Almannaverkið greiðir frá, at spurningurin um hvat skúlatilboð er best hóskandi fyri ávísa barnið, sum heild verður viðgjørdur í tvørgeiraliga toyminum, tá barnið er um 5 ár. Tey vísa tó á, at hetta krevur, at allir partar luttaka á fundinum, og at hetta tí ikki altíð letur seg gera. Sernám vísir á, at tilgongdin við at finna hóskandi skúlatilboð ofta er byrjað, áðrenn hetta verður umrøtt á TGT fundi og at hetta er ein tilgongd, sum Sernám hevur saman við dagstovnunum. Autismufelagið vísir á, at fyri at mannagongdin í mun til skúlabyrjan skal fylgjast, er tað týdningarmikið, at Sernám luttekur á TGT fundinum, tá ið barnið er 5 ár, tí tað er Sernám, sum hevur visitatiónsleiklutin og einki verður sett í gongd uttan tey.

Skúlarnir vísa á, at teir ikki eru partar av hesari mannagongd. Teir meta, at tað mest vanliga er, at børnini ikki hava fingið autismudiagnosuna, áðrenn tey byrja í skúlanum.

Allir dagstovnar kenna ikki til hesa mannagongd, møguliga tí teir ikki hava havt børn, sum hava fingið staðfest autismu, men einstakur dagstovnur vísir á, at tað er komið fyri, at foreldur nærum hava verið ov sein at gera vart við, at barn teirra hevur tørv á einum serskúla- ella serflokkatilboðið, tí tey ikki hava fingið nóg góða kunning og vegleiðing frá Sernámi.

### 6.4.3 Skipað skifti millum dagstovn og skúla

Autismufelagið vísir á, at tað ikki verður raðfest nóg høgt, at børnini fáa eitt skipað skifti frá dagstovni til skúla/forskúla. Ofta koma boðini um hvat skúla, serskúla- ella serflokkatilboð barnið er sloppið í, beint fyri summarfrítíðina, og tá er barnið kanska farið úr barnagarðinum.

Skúlarnir eru ymiskir á máli um, hvørt henda mannagongd verður fylgd. Tað vísir seg at vera ymist um børnini eru útgreinaði, áðrenn tey byrja í skúla, ella um Sernám hevur verið ein partur av tilgongdini hjá teimum, sum eru útgreinað. Harumframt vísir hoyringartilgongdin, at tað sjáldan er samband millum dagstovn og skúla áðrenn skúlabyrjan. Einstakir skúlar vísa á, at tað eru foreldrini sjálvi, sum venda sær til skúlan og so skipar skúlin fyri einum fundi við foreldrini um tørvin hjá barninum og hvat skúlin

kann bjóða. Tveir skúlar vísa á, at mannagongdin verður fylgd. Ein skúli greiðir í hesum sambandi frá, at tey hava skiftisfund við barnagarðin. Hesin fundur liggur til grund fyri eini ætlan fyri skúlatilboðið til barnið, og annars samskiftir skúlin við Sernám og fær ráðgeving frá teimum um skúlagongdina.

Sum áður nevnt, eru svarini, frá dagstovnunum og námsfrøðiligu ráðgevingunum hjá kommununum, í fleiri førum merkt av, at Sernám í tíðarskeiðinum, tá ið spurningarnir vórðu sendir út, hevði avmarkað sítt virksemi á dagstovnaøkinum. Einstakur dagstovnur vísir á, at tey hava skiftisfundir, áðrenn barnið fer í skúla. Hesir fundir liggja í mai/juni. Ein frítíðarskúli vísir á, at tey eru við til netfund, har skiftið frá dagstovni til skúla og frítíðarskúla verður skipað. Námsfrøðiligu ráðgevararnir vísa á, at henda mannagongd verður fylgd. Víst verður eisini á, at tað ikki er nóg væl skipað. Stovnar fara ofta sjálvir til skúlan, við loyvi frá foreldrunum, men Sernám er ikki altíð partur av hesum. Ofta verður frítíðarskúlin gloymdur í hesum skifti. Víst verður á, at tað ikki er nóg greitt hvør kunnar hvønn.

Til hoyringarfundin vísti Sernám á, at í mun til skúlabyrjan, er teirra leiklutur avmarkaður til tey børn, har Sernám er inni í málinum. Sernám er ofta við til yvirleveringarfundir í hesum førum, serliga um tey hava eina uppgávu víðari saman við skúlanum. Vanligt er, at dagstovnurin er tann innbjóðandi parturin til fundin.

### 6.4.4 Samanumtøka

Samanumtikið sær tað út til at vera ymist hvussu mannagongdirnar verða fylgdar, tá ið eitt barn við autismu skal byrja í skúla. Okkurt týðir upp á, at skiftið millum dagstovn og skúla kundi verið betur skipað og greiða eigur at fáast á, hvør hevur ábyrgdina av hesum.

**Tann góða tilgongdin – Tá barnið fer í skúla**

| Mannagongd faldarin | Mannagongd í dag | Er broytingin avtalað millum partarnar ella góðkend í stýrisbólkinum? |
|---|---|---|
| Sernám ger eina støðumeting av barninum í sambandi við skúlabyrjan. | **Er stúranin um skúlagongd so mikið stór, at hugsað verður um sertilboð ella serskúla** so ger Sernám eina støðumeting av barninum í sambandi við skúlabyrjan. | Mannagongdin er ikki broytt, við tað at mannagongdin í faldaranum ongantíð varð íverksett í praksis. |
| Spurningurin, hvat skúlatilboð er best hóskandi fyri ávísa barnið, verður viðgjørdur í tvørgeiraliga toyminum, tá barnið er um 5 ár. Ivamálini kunnu vera fleiri, og avgerðir hesum viðvíkjandi verða eftirmettar í toyminum, sum barnið mennist og broytist. | Spurningurin, hvat skúlatilboð er best hóskandi fyri ávísa barnið, verður viðgjørdur í tvørgeiraliga toyminum, tá barnið er um 5 ár. Ivamálini kunnu vera fleiri, og avgerðir hesum viðvíkjandi verða eftirmettar í toyminum, sum barnið mennist og broytist. | Mannagongdin er óbroytt. |
| Øll børn við autismu fáa eitt skipað skifti frá dagstovni til skúla/forskúla. Dagstovnurin og kommunan skulu kunna skúlan um støðuna hjá barninum í góðari tíð áðrenn skúlabyrjan. Kunningin verður gjørd í samráð við Sernám. | Tað er ymiskt um børn við autismu fáa eitt skipað skifti frá dagstovni til forskúla/skúla.<br><br>Dagstovnurin og kommunan skulu kunna skúlan um støðuna hjá barninum í góðari tíð áðrenn skúlabyrjan. **Tá talan er um serskúla ella sertilboð skal kunningin vera gjørd í samráð við Sernám.** Tað kemur tó ov ofta fyri, at tað er manglandi samskifti ímillum dagstovn og skúla. Ábendingar eru eisini um at kunningin um sertilboð ella serskúla í ávísum førum kemur ov seint, og at tað ikki er nóg greitt hvør kunnar hvønn. | Mannagongdin um at øll børn við autismu fáa eitt skipað skifti er ikki broytt, við tað at mannagongdin í faldaranum ongantíð varð íverksett í praksis. Tað sama er galdandi við mannagongdini um at øll kunning um skúlabyrjan verður gjørd í samráð við Sernám.<br><br>Mannagongdin um at dagstovnurin og kommunan skulu kunna skúlan um støðuna hjá barninum í góðari tíð áðrenn skúlabyrjan er óbroytt. Tó vísir tað seg at vera ymiskt hvussu hetta virkar í praksis. |

## 6.5 Tillagingar "Tannárini – vaksnamannatilveran"

Fjórði og seinasti partur av TGT við heitinum „Tannárini – vaksnamannatilveran“ snýr seg um hvør mannagongdin er, tá ið barnið gerst tannáringur, eins og hvørji evni skulu viðgerast á seinasta fundinum í TGT, í sambandi við at tann ungi gerst 18 ár.

Í hesum broti vísir faldarin á fylgjandi mannagongd:

> *„Ein nýggj støðumeting verður gjørd, tá barnið er 14-15 ár, og ein ætlan skal leggjast fyri vaksmannalívið. Ein fastur partur av virkisætlanini er at staðfesta, hvat tilboð ávísa barnið hevur ynski um og tørv á eftir loknan fólkaskúla. Virkisætlanin skal viðgera hesar spurningar, tá ið barnið er um 14-15 ár: Hvørji ynskir hevur barnið um útbúgving ella arbeiði? Er hóskandi miðnámstilboð? Er annað hóskandi skúlatilboð? Er tørvur á arbeiðsbúgvingartiltaki, t.d. arbeiðsroynd?*
>
> *Eftir eina mennandi tilgongd í skúlaverkinum ella á arbeiðsmarknaðinum skal virkisætlanin greina vaksnamannatilveruna. Viðgerast skal hvør framtíðarbústaðurin skal vera og hvat uppihaldsgrundarlagi skal vera.*
>
> *Fólkaskúlin bjóðar øllum børnum við autismu skúlavegleiðing, tá tey eru 14-15 ár.“*

Samanumtikið vísa hoyringarsvarini frá pørtunum, at broytingar eru gjørdar í hesum partinum, síðani TGT varð sett í verk, eins og at tað eru partar av tilboðunum, sum ongantíð eru íverksettir.

### 6.5.1 Støðumeting og vaksnamannatilveran

Almannaverkið greiðir frá, at støðumetingin, ið upprunaliga skuldi gerast, tá ið barnið var 14-15 ár, ikki verður gjørd fyrr enn barnið er fylt ávikavist 16 ella 17 ár. Orsøkin til hesa broyting er, at Almannaverkið metir, at hesin aldur er best hóskandi til at gera ein ætlan fyri vaksmannalívið. Harumframt eru tað nøkur børn við autismu, ið fara eitt ár seinni í skúla enn vanligt, og tá er tað enn meira aktuelt, at henda ætlan verður gjørd, tá barnið er 16-17 ár. Harvið verða ynski um útbúgving, og spurningar um skúlatilboð, arbeiði, framtíðarbústað og uppihaldsgrundarlag alt viðgjørt, tá barnið er 16 og 17 ár. Hetta kann bæði vera á einum samlaðum fundi, ella yvir tveir fundir, alt eftir støðuni og tørvinum í hvørjum einstøkum føri. Sernám og Autismufelagið viðmerkja í hesum sambandi, at tey meta, at tað kann vera ov seint, at hesin fundur ikki er áðrenn barnið er 16-17 ár, við tað at foreldur ofta byrja at stúra um hvat hendur aftaná fólkaskúlan, tá ið barnið er millum 14 – 16 ár.

Í sambandi við at leggja eina ætlan fyri vaksnamannalívið, viðmerkja Sernám og fleiri skúlar, at tey hava lítlan ella ongan leiklut hesum viðvíkjandi, og tí luttaka tey ikki eins ofta á hesum fundum. Tó viðmerkir ein einstakur skúli, at hann brúkar nógva orku uppá at hjálpa næminginum víðari til aðra fyriskipan, eftir loknan fólkaskúla. Hetta verður m.a. gjørt við at vitja skúlar og arbeiðspláss.

### 6.5.2 Skúlavegleiðing til børn við autismu

Viðvíkjandi tí, at fólkaskúlin bjóðar øllum børnum við autismu skúlavegleiðing, tá ið tey eru 14-15 ár, so staðfesta hoyringarsvarini, at tað eru skúlavegleiðarar í fólkaskúlunum, ið bjóða skúlavegleiðing til øll børn, og at hetta ikki er tongt at diagnosu. Sernám upplýsir, at tað er eingin tílík vegleiðing sett í verk, ið er serskilað til øll børn við autismu. Tó upplýsa einstakir skúlar, at hendan vegleiðing verður veitt, meðan aðrir ikki veita tílíka. Eisini greiðir ein skúli frá, at tílík vegleiðing verður veitt í summum førum, men at hetta ikki er nóg skipað, og ikki er eitt fast tilboð, til næmingar við autismu.

### 6.5.3 Samanumtøka

Við støði í omanfyristandandi, kann arbeiðsbólkurin staðfesta, at fylgjandi broytingar eru framdar í TGT „tannárini – vaksnamannatilveran“:

## Tann góða tilgongdin – Tannárini – vaksnamannatilveran

| Mannagongd faldarin | Mannagongd í dag | Er broytingin avtalað millum partarnar ella góðkend í stýrisbólkinum? |
|---|---|---|
| Ein nýggj støðumeting verður gjørd, tá barnið er 14-15 ár, og ein ætlan skal leggjast fyri vaksnamannalívið. Ein fastur partur av virkisætlanini er at staðfesta, hvat tilboð ávísa barnið hevur ynski um og tørv á eftir loknan fólkaskúla. Virkisætlanin skal viðgera hesar spurningar, tá ið barnið er um 14-15 ár: Hvørji ynskir hevur barnið um útbúgving ella arbeiði? Er hóskandi miðnámstilboð? Er annað hóskandi skúlatilboð? Er tørvur á arbeiðsbúgvingartiltaki, t.d. arbeiðsroynd? | Ein nýggj støðumeting verður gjørd, **tá barnið er 16-17 ár**, og ein ætlan skal leggjast fyri vaksnamannalívið. Ein fastur partur av virkisætlanini er at staðfesta, hvat tilboð ávísa barnið hevur ynski um og tørv á eftir loknan fólkaskúla. Virkisætlanin skal viðgera hesar spurningar, **tá ið barnið er um 16-17 ár:** Hvørji ynskir hevur barnið um útbúgving ella arbeiði? Er hóskandi miðnámstilboð? Er annað hóskandi skúlatilboð? Er tørvur á arbeiðsbúgvingartiltaki, t.d. arbeiðsroynd? | Almannaverkið hevur gjørt av at broytt aldursbólkin fyri fundin. Avgerðin er grunda á teirra royndir, og er ikki avtalað millum partarnar ella góðkend av stýrisbólkinum. |
| Eftir eina mennandi tilgongd í skúlaverkinum ella á arbeiðsmarknaðinum skal virkisætlanin greina vaksnamannatilveruna. Viðgerast skal hvør framtíðarbústaðurin skal vera og hvat uppihaldsgrundarlagi skal vera. | Eftir eina mennandi tilgongd í skúlaverkinum ella á arbeiðsmarknaðinum skal virkisætlanin greina vaksnamannatilveruna. Viðgerast skal hvør framtíðarbústaðurin skal vera og hvat uppihaldsgrundarlagi skal vera. | Mannagongdin er óbroytt. |
| Fólkaskúlin bjóðar øllum børnum við autismu skúlavegleiðing, tá tey eru 14-15 ár. | Fólkaskúlin bjóðar børnum skúlavegleiðing, **men skúlavegleiðing verður ikki bjóða serskilað til børn ið autismu.** | Mannagongdin er ikki broytt, við tað at mannagongdin í faldaranum ongantíð varð íverksett í praksis. |



## 6.6 Niðurstøða

Arbeiðsbólkurin kann út frá omanfyri standandi staðfesta, at TGT í dag ikki virkar sambært upprunaliga endamálinum, og at samsvar ikki er ímillum avtalaða leistin, ið er lýstur í faldaranum, og praksis.

Omanfyri standandi gjøgnumgongd vísir, at fleiri broytingar eru gjørdar í TGT mannagongdini, síðani TGT varð íverksett, og er tað ymiskt, í hvønn mun, hesar eru góðkendar ella umrøddar í stýrisbólkinum. Í hesum førum tykist tað, sum stovnarnir, hvør í sínum lagi, hava broytt mannagongdir, tilboð ella tænastur, og harvið broytt sín leiklut í TGT. Hetta tykist ikki at vera gjørt í samráði við hinar partarnar av samstarvinum, men hava partarnir bert fingið fráboðan um hetta eftirfylgjandi.



Broytingarnar, ið serliga ávirka skipanina við TGT eru fylgjandi:

- Allar ávísingar til B&U psykiatriina fara nú umvegis kommunulæknan.
- Undirvísing til foreldur um autismu, er flutt frá B&U psykiatri til Heimaráðgevingina í Almannaverkinum
- Fundir í TGT verða bert hildnir um Sernám boðar frá luttøku. Undantikið er seinasti fundur, í sambandi við at barnið fyllir 18 ár.
- Støðumetan í sambandi við skúlabyrjan verður bert gjørd, um stúranin um skúlagongd er so mikið stór, at hugsað verður um sertilboð ella serskúla, og tað tykist vera ymiskt um børn við autismu fáa eitt skipað skifti frá dagstovni til skúla/forskúla
- Ætlanin fyri vaksnamannalívið verður viðgjørd, tá ið barnið er 16-17 ár

Umframt, at broytingar eru framdar síðani TGT varð íverksett, so vísir eftirmetingin, at tað eru fleiri mannagongdir í faldaranum, sum partvís ella ongantíð hava verið praksis. Harumframt framgongur, at tað á summum økjum, er ymiskt um og í hvønn mun, mannagongdin verður fylgd. Hetta hevur við sær, at tænastan til børn við autismu gerst ymisk.

Talvan niðanfyri vísir eina samlaða mynd av hvussu núverandi mannagongdir eru í TGT. Í teimum førum, at mannagongdin ikki er í samsvari við upprunaliga faldaran er teksturin markaður við feitum.

## Tann góða tilgongdin – samlað yvirlit

| Tá ábending er um autismu | Tá autisma er staðfest |
|---|---|
| Um barnið verður ansað heima, kunnu foreldur venda sær til heilsufrøðingin ella kommunulæknan um stúranina. Er barnið á dagstovni ella í skúla, kunnu foreldrini tosa við starvsfólkini um stúranina.<br><br>Heilsufrøðingurin, kommunulæknin ella starvsfólkini í barnaansingini gera síðani eina metan av støðuni. Hava tey somu stúran um menningina hjá barninum, ávísir Heilsuwfrøðingurin til kommunulæknan, og kommunulæknin til Psykiatriska depilin., Dagstovnurin og skúlin venda sær til kommunalu námsfrøðiligu ráðgevingina/ førleikastovuna og/ella Sernám umvegis sernámsfundirnar. Hetta verður gjørt í samráði við foreldrini.<br><br>Eru starvsfólkini ikki samd við foreldrunum um, at orsøk er at vera stúrin um menningina hjá barninum, **og foreldrini venda sær til Sernám við síni stúran, so tekur Sernám málið upp við dagstovnin ella skúlan. Um starvsfólkini framvegis ikki eru samd kunnu starvsfólkini fáa eina „generella ráðgeving“ um autismu frá Sernám.**<br><br>Sernám greinar síðani støðuna hjá barninum **grunda á eygleiðingarnar hjá foreldrum, dagstovninum/skúlanum og møguliga egnum eygleiðingum.** Tá støðan er greinað, vendir Sernám aftur til starvsfólkini við ráðgeving, so námsfrøðin skjótast gjørligt verður tillagað barninum.<br><br>**Um Heilsufrøðingurin, Sernám, Barnaverndartænastan ella starvsfólk, ið eru um barnið í dagligdegnum meta, at illgruni er um, at barnið hevur autismu, so biðja tey foreldrini venda sær til kommunulæknan. Um hesi hava skjøl um barnið geva tey foreldrunum hesi at hava við til kommunulæknin. Kommunulæknin ger síðani av um barnið verður ávíst til Psykiatriska depilin,** sum ger serkanningar og kann staðfesta um talan er um autismu.<br><br>Áðrenn barnið verður ávíst til barna- og ungdómsprykiatriska toymið á Psykiatriska deplinum, skal tað til eina vanliga barnakanning hjá egnum kommunulækna. Ráðini eru, at barnið skal kannast fyri aðrar likamligar sjúkur, sum kunnu misfatast fyri autismu. | Tá autisma er staðfest, **fáa foreldrini undirvísing í Almannaverkinum,** saman við øðrum foreldrum. Endamálið er at læra at skilja hvat autisma er.<br><br>Eitt tvørgeiraligt toymi við einum samskipara verður skipað til hvørt barn.<br><br>Toymið verður mannað við foreldrunum og umboðum fyri hvørt av hesum økjum: almanna-økinum, heilsuøkinum, námsfrøðini og sernáms-frøðini. **Sernám og Almannaverkið luttaka í øllum toymum,** men annars verður toymið sett saman alt eftir støðuni hjá ávísa barninum. **Fundir vera bert hildnir um Sernámboðar frá luttøku. Undan-tikið er seinasti fundur í TGT í sambandi við barnið fyllir 18 ár. B&U psykiatriin luttekur bert á fyrsta fundi. Er talan um komorbiditet kann B&U psykiatriin luttaka á eftirfylgjandi TGT fundum.**<br><br>Ein sosialráðgevi hjá Almannaverkinum er **altíð** samskipari hjá familjuni.<br><br>**Um barnið frammanundan er eitt aktivt mál hjá Sernámi** hevur toymið fund einaferð árliga og annars, tá tørvur er.<br><br>Psykiatriski depilin innkallar til fyrsta fund í toyminum. Seinni er tað samskiparin, sum fyriskipar toymisfundir.<br><br>Í gerandisdegnum samskifta foreldrini við tey starvsfólk, sum eru um barnið. Men, hava foreldur tørv á at koma í samband við toymið, skulu tey venda sær til samskiparan.<br><br>Toymið ger eina virkisætlan fyri barnið, grundað á tørvin hjá barninum og ynskini hjá barninum og foreldrunum. Allir toymislimir semjast um ætlanina, og soleiðis verða útlitini og gongdin greið, og øll kenna sína uppgávu og ábyrgd. Øll hugsandi ivamál skulu viðgerast í toyminum, og støða skal takast til bestu loysn. Virkisætlanin verður dagførd á hvørjum toymisfundi.<br><br>Er tørvur á kreppuhjálp eftir at autisman er staðfest, skal kommunulæknin ávísa foreldrum og barnið til viðgerð hjá privatstarvandi sálarfrøðingi. Hendan kreppuhjálp verður goldin partvíst við gjaldi frá Heilsutrygd, og foreldur kunnu søkja Almannaverkið um gjald av egingjaldinum.<br><br>**Samskiparin er eisini sosialráðgevi teirra í Almannaverkinum.** Hesin veitir teimum ráðgeving um møguleikarnar fyri fíggjarligum stuðli eftir almannalógini. Somuleiðis veitir samskiparin ráðgeving um møguligar tænastur eftir almannalógini. |

| Skúlabyrjan | Vaksnamannatilveran |
|---|---|
| **Er stúranin um skúlagongd so mikið stór, at hugsa verður um sertilboð ella serskúla** so ger Sernám eina støðumeting av barninum í sambandi við skúlabyrjan.<br><br>Spurningurin, hvat skúlatilboð er best hóskandi fyri ávísa barnið, verður viðgjørdur í tvørgeiraliga toyminum, tá barnið er um 5 ár. Ivamálini kunnu vera fleiri, og avgerðir hesum viðvíkjandi verða eftirmettar í toyminum, sum barnið mennist og broytist.<br><br>Tað er ymiskt um børn við autismu fáa eitt skipað skifti frá dagstovni til forskúla/skúla. Dagstovnurin og kommunan skulu kunna skúlan um støðuna hjá barninum í góðari tíð áðrenn skúlabyrjan. **Tá talan er um serskúla ella sertilboð skal kunningin vera gjørd í samráð við Sernám.** Tað kemur tó ov ofta fyri, at tað er manglandi samskifti ímillum dagstovn og skúla. Ábendingar eru eisini um at kunningin um sertilboð ella serskúla í ávísum førum kemur ov seint, og at tað ikki er nóg greitt hvør kunnar hvønn. | Ein nýggj støðumeting verður gjørd, tá barnið er 16-17 ár, og ein ætlan skal leggjast fyri vaknasmannalívið. Ein fastur partur av virkisætlanini er at staðfesta, hvat tilboð ávísa barnið hevur ynski um og tørv á eftir loknan fólkaskúla. Virkisætlanin skal viðgera hesar spurningar, tá ið barnið er um 16-17 ár: Hvørji ynskir hevur barnið um útbúgving ella arbeiði? Er hóskandi miðnámstilboð? Er annað hóskandi skúlatilboð? Er tørvur á arbeiðsbúgvingartiltaki, t.d. arbeiðsroynd?<br><br>Eftir eina mennandi tilgongd í skúlaverkinum ella á arbeiðsmarknaðinum skal virkisætlanin greina vaksnamannatilveruna. Viðgerast skal hvør framtíðarbústaðurin skal vera og hvat uppihaldsgrundarlagi skal vera.<br><br>Fólkaskúlin bjóðar børnum skúlavegleiðing, **men skúlavegleiðing verður ikki bjóða serskilað til børn ið autismu.** |



# 7. Samskiparaleikluturin

Í arbeiðssetninginum varð arbeiðsbólkurin biðin um at lýsa og greina, í hvønn mun leisturin við einum samskipara virkar, í mun til endamálið.

Tískil hava vit valt at hava hetta, sum eitt serskilað evni, í hoyringartilgongdini, ið er viðgjørt við allar viðkomandi partar. Niðanfyri verða leikluturin og uppgávurnar hjá samskiparanum lýstar, eins og í hvønn mun hesi virka eftir endamálinum.

## 7.1 Leikluturin og uppgávurnar hjá samskiparanum

Samskiparaleikluturin er staðsettur í Almannaverkinum. Samskiparin hevur ábyrgdina av, at fundir verða hildnir, umframt at ein virkisætlan verður gjørd. Samskiparin setir seg í samband við foreldrini nakrar vikur áðrenn barnið hevur føðingardag og spyr um og nær fundur skal vera í TGT og hvørjir partar foreldrini ynskja skulu luttaka á fundinum.

Samskiparin sendir síðani út fundarinnkalling og eina standard skrá til partarnir. Hetta eru oftast teir partar, sum eru um barnið í gerandisdegnum.

Samskiparin stýrir fundinum og tryggjar, at øll koma til orðanna. Á fundinum er tað samskiparin, sum hevur til uppgávu at stýra fundinum, við tí fyri eyga, at fáa avbjóðingarnar hjá familjuni lýstar, fáa partarnir at lýsa møguleikar og at fáa avtalur í lag um loysnir, eins og hvør hevur ábyrgdina av at fremja loysnirnar í verki. Møguleiki er fyri vitanardeiling millum allar partar og á henda hátt, kunnu amboð og háttaløg, sum vísa seg at vera gevandi fyri barnið, nýtast av øllum, sum eru um barnið í gerandisdegnum. Í og við at samskiparin samstundis er sosialráðgevi teirra í Almannaverkinum, so veitir samskiparin eisini ráðgeving um møguleikarnir fyri fíggjarligum stuðli eftir almannalóggávuni og um møguligar tænastur, tey kunnu søkja um.

Eftir fundin skrivar samskiparin hvat er avtalað á fundinum, hvat skal gerast fyri barnið og familjuna, til fundur er aftur árið eftir, í eina virkisætlan, sum samskiparin síðani sendir pørtunum. Tað eru síðani partarnir sjálvir, sum hava ábyrgd av at fylgja tí upp, sum er avtalað.

Endamálið við at hava ein samskipara er, at foreldrini hava eitt stað at venda sær, um tey hava tørv á hjálp og ikki sjálvi skulu seta seg í samband við ein myndugleika fyri og annan eftir.

Samanumtikið vísa flestu hoyringarpartar á, at leisturin við einum samskipara virkar væl, at omanfyristandandi leistur verður fylgdur og at samskiparaleikluturin er væl staðsettur í Almannaverkinum.

Sum dømi kann nevnast, at B&U psykiatriin metir, at tað er gott at tað er ein samskipari í hvørjum máli, soleiðis at tað er týðiligt fyri bæði familjur og stovnar, hvønn tey skulu venda sær til. Eisini vísir Sernám á, at tað er gott at samskiparaleikluturin er til staðar og staðsettur í einum stað, og at tað er natúrligt, at Almannaverkið hevur uppgávuna, við tað, at tey fylgja ofta barninum/foreldrunum longst av teimum, sum eru á fundi.

Fleiri skúlar, barnaverndartænastur og kommunalar námsfrøðiligar ráðgevingar eru samdar í, at samskipanarleikluturin í høvuðsheitum riggar væl, og at tað er eitt gott amboð, at samskiparin skrivar avtalurnar niður og sendir út til partarnar. Tó verður í summum førum víst á, at tað ov ofta er komið fyri, at samskiparin hjá familjuni ikki er tann sami ár eftir ár, og at hetta tá er órógvandifyri fundin. Tá kann tað kennast sum byrjast skal av nýggjum, tí viðkomandi í ov lítlan mun kennir til barnið. Eisini verður víst á, at tað til tíðir er ein trupulleiki, at tað gongur ov long tíð frá fundurin varð hildin, til virkisætlanin verður sent pørtunum.

Almannaverkið vísir í hesum sambandi á, at tað kemur fyri, at ein nýggjur samskipari er til nakrar

fundir og hesin tá ikki altíð kennir barnið og familjuna, men setir seg inn í málið. Tey vilja helst ikki avlýsa ein TGT fund av hesi orsøk.

Autismufelagið metir, at ein samskipari má vera, og at Almannaverkið hevur røkt hesa uppgávuna væl, eins og at tað riggar væl við netfundunum, sum Almannaverkið skipar fyri. Almannaverkið metir somuleiðis, at tað riggar væl, at ein samskipari er, sum hevur ábyrgdina av at fundir verða hildnir, umframt at virkisætlan verður gjørd. Hetta tí leisturin við einum samskipara ger, at tað er ein og sami partur, sum hevur ábyrgdina av at kalla inn til fund, at virkisætlan verður gjørd, umframt at foreldrini vita, at tað er til ein myndugleika, tey kunnu venda sær til, hava tey avbjóðingar.

Viðvíkjandi at faldarin ásetur, at foreldrini skulu venda sær til samskiparan um tey hava tørv á, at koma í samband við toymið, sigur Almannaverkið, at tað kemur sjáldan fyri, at foreldur venda sær til teirra og ynskja at fáa fatur á toyminum. Sernám viðmerkir í hesum sambandi, at tey uppliva, at tað eru foreldur, heldur enn samskiparin, sum kontaktar Sernám. Almannaverkið upplýsir, at tá foreldur venda sær til samskiparan, verður spurt, hvar avbjóðingin liggur, fyri at fáa greiðu á, um tørvur er á at øll samlast, ella um tørvur er á at fundur verður avtalaður millum ávísar partar í toyminum. Eftir prátið við foreldrini, verður avrátt saman við teimum, hvør skal bjóðast á fund. Umframt árliga TGT fundin, hevur Almannaverkið í slíkum førum fund, har annaðhvørt alt toymið er savnað, ella ávísir partar í toyminum. Autismufelagið metir at samskiparin verður brúktur soleiðis, at foreldrini lættari koma í samband við aðrar myndugleikar.

Sambært faldaranum, sum verður latin foreldrunum, so samskifta foreldrini í gerandisdegnum við tey starvsfólk, sum eru um barnið. Í ávísum førum venda foreldrini sær til samskiparan, tí tey kenna seg kroystan ella pressaðan í støðuni tey eru í. Almannaverkið metir, at tá kann eitt prát við samskiparan til tíðir hjálpa foreldrunum at fáa greiðu á, hvønn tey skulu venda sær til sjálvi.

## 7.2 Samanumtøka

Út frá omanfyristandandi kann arbeiðsbólkurin staðfesta, at samskiparaleikluturin í stóran mun riggar sambært upprunaliga endamálinum. Flestu partar vístu í hoyringartilgongdini á, at teir meta, at samskiparaleikluturin liggur væl hjá Almannaverkinum, serliga tí tað er sosialráðgevin hjá familjunum, sum hevur leiklutin.

# 8. Avbjóðingar og tørvur á tillagingum

Sum víst á omanfyri vísir eftirmetingin, at tað eru nógvar tillagingar gjørdar bæði í og rundanum TGT. Fleiri partar hava broytt mannagongdir, og eisini verður staðfest, at tað í fleiri førum kemur fyri, at partar ikki møta til fundir, at fleiri fundir tí ikki vera hildnir og at avtalur, ið verða gjørdar á fundinum ikki vera framdar. Hóast semja er um, at TGT er ein góð hjálp fyri hesar familjur, tá ið hon virkar eftir ætlan, so tykist tað sum um at tað er ein fánýtiskensla hjá pørtunum, ið ikki kenna seg at strekkja til. Í hoyringartilgongdini gjørdist tað greitt fyri arbeiðsbólkinum, at tað eru fleiri avbjóðingar, ið ávirka TGT, eins og at tørvur er á at tillaga og nýhugsa skipanina, um hon aftur skal virka sum eitt samskipandi forum, ið lættir um hjá familjunum.

Í hesum parti verða tær avbjóðingar, ið eftirmetingin hevur víst lýstar, eins og hvørjar tillagingar mett verður at tørvur er á. Í fleiri førum eru partarnir ymiskir á máli um, hvørjar avbjóðingarnar eru, og hvussu hesar kunnu loysast. Arbeiðsbólkurin hevur roynt at lýsa hetta frá øllum sjónarmiðum, og gjørt tilmælir út frá hesum.

## 8.1 Ávísingartilgongdin

Arbeiðsbólkurin kann út frá hoyringartilgongdini staðfesta, at Sernám hevur broytt mannagongd, og ávísir ikki longur børn beinleiðis til B&U psykiatriina, tá ið ábending er um at eitt barn hevur autismu. Sostatt fara allar ávísingar til B&U psykiatriina umvegis kommunulæknan í dag.

Hóast tað tykist sum at flest allir partar eru vitandi um, at hetta er mannagongdin í dag, so vísa hoyringarsvarini samstundis, at tað eru ymiskar meiningar um, hvørt hendan mannagongd eigur at broytast. Serliga er tað greitt, at Sernám og B&U psykiatriin ikki eru samd um, hvussu vegurin til B&U psykiatriina skal vera í sambandi við útgreining.

Sernám vísir á, at kommunulæknaskipanin er høvuðsinngongdin til heilsuverkið, og hetta ikki eigur at broytast. Um avbjóðingar eru hesum viðvíkjandi, so verður mett, at tað má vera gjørligt at seta faklig krøv til, at skipanin eisini megnar at gera ávísingar til B&U psykiatriina. Harumframt verður víst á, at foreldur skulu til kommunulækna til eina barnakanning, tá ið ábending er um autismu, og skulu tí venda sær til kommunulæknan óansæð um Sernám hevur verið ein partur av málinum hjá barninum ella ikki. Sernám metir tí ikki, at tað er skilagott at krevja, at Sernám skal vera ein fastur partur av ávísingartilgongdini, tí tað viðførir krav um, at foreldur skulu venda sær til tvey støð.

Tá ið Sernám ávísti beinleiðis til B&U psykiatriina, eins og faldarin vísir á, sendu tey lýsingar- og kanningartilfarið um barnið, ið teirra sálarfrøðingar, sernámsfrøðiligu ráðgevarar, talurráðgevarar o.o. høvdu gjørt, saman við ávísingini. Sernám greiðir frá, at tey til tíðir upplivdu at fáa ávísingar aftur frá B&U psykiatriini, oftast við ynski um, at Sernám gjørdi fleiri kanningar av barninum afturat. Sernám greiðir frá, at tað ikki er uppgávan hjá Sernámi at gera kanningar fyri B&U psykiatriina, eftir umbøn frá teimum. Uppgávan hjá Sernámi er at ráðgeva skúlum og dagstovnum. Alt lýsingar- og kanningararbeiðið, ið Sernám ger, verður gjørt tí Sernám metir, tey hava tørv á hesum, fyri at ráðgeva skúlum og dagstovnum. Tá ið eitt samstarv verður sett í verk, um tað einstaka barnið, eru foreldrini eisini ein partur av ráðgevingini. Sostatt ger Sernám kanningar til sítt endamál, og B&U psykiatriin hevur eitt annað endamál, og vísir Sernám í hesum sambandi á at B&U psykiatriin hevur egnar sálarfrøðingar í starvi til hetta.

Við støði í omanfyristandandi, tók Sernám avgerð um ikki longur at ávísa til B&U psykiatriina. Tó ger Sernám greitt, at tá ið Sernám er í málinum hjá einum barni, ið kommunulæknin ávísir til B&U psykiatriina, hjálpir Sernám – við samtykki frá foreldrunum – B&U psykiatriini og kommunulæknum við tilfari, sum Sernám hevur um barnið. Í summum førum hava foreldur tilfar frá Sernámi við sær til kommunulæknan.

B&U psykiatriin metir tað vera neyðugt við einum stovni, sum hevur sernámsfrøðiliga vitan um børn og menning teirra, eins væl og um møgulig frávik, sum kann ávísa til B&U psykiatriina og samstundis er førur fyri at seta málrættaði tiltøk í verk í nærumhvørvinum. B&U psykiatriin greiður frá, at innanfyri psykiatri verður skilt ímillum, tá ið ein sjúka ella brek er íkomið ella íborið. Tá ið okkurt er íkomið, so metir B&U psykiatriin, at tað er upplagt, at kommunulæknin ávísir, men tá tað er okkurt, sum er íborið, harímillum autisma, so metir B&U psykiatriin, at Sernám hevur teir neyðugu og bestu fortreytirnar til at ávísa til B&U psykiatriina, tí at tey hava fortreytir, til at vera inn yvir menningarsøguna hjá barninum.

B&U psykiatriin metir ikki, at tað er optimalt, at allar ávísingar nú koma umvegis kommunulæknan. B&U psykiatriin upplivir at hendan mannagongd millum annað hevur við sær, at alt ov nógvar ávísingar koma til B&U psykiatriina, uttan at nakað annað er roynt áðrenn. B&U psykiatriin metir, at tað er alneyðugt, at ymiskt er roynt áðrenn eitt barn verður ávíst til B&U psykiatriina, eins og at tað er neyðugt, at eygleiðingar og aðrar forkanningar eru gjørdar fyri at meta um, um barnið skal ávísast til B&U psykiatriina, ella um onnur átøk skulu gerast.

Samanumtikið metir B&U psykiatriin, at tað manglar eitt „filtur", ið setir átøk í verk, og ger eygleiðingar og kanningar, áðrenn mett verður um, um tørvur er á útgreining, ella um onnur hjálp kann verða veitt í nærumhvørvinum. Ein ráðgevandi stovnur verður mettur at vita nógv um menningina hjá barninum, og kann tí meta um nær tørvur er á onkrum meira. Tá ið tørvur er á onkrum meira, eigur hesin ráðgevandi stovnurin, at hava møguleika fyri at ávísa beinleiðis til B&U psykiatriina, uttan at foreldrini skulu gera hetta umvegis kommunulæknan. Tí verður mett, at tað bæði er Sernám og kommunulæknaskipanin, ið eiga at kunna ávísa til B&U psykiatriina.

Sum víst á omanfyri, er Sernám av teirri fatan, at kommunulæknaskipanin er høvuðsinngongdin til heilsuverkið, og at allar ávísingar til B&U psykiatriina eiga at fara umvegis kommunulæknan, meðan B&U psykiatriin er av teirri fatan, at kommunulæknar og Sernám eiga at vera tey, sum kunnu ávísa til B&U psykiatriina. Báðir partar eru tó samdir um, at tað er tørvur á at fáa lýst og avklárað hvørjar uppgávur, hvør stovnur hevur í sambandi við ávísingar. Sernám og B&U psykiatriin hava haft fleiri fundir um hetta býtið áður, uttan at koma á mál.

Í Føroyum eru 36 kommunulæknaviðtalur. Í tilgongdini at eftirmeta TGT, hevur arbeiðsbólkurin sett seg í samband við allar viðtalurnar umvegis Heilsutrygd. Fýra kommunulæknar, umboðandi fýra kommunulæknaviðtalur, hava valt at luttaka í hesum arbeiði. Hesir vísa á, at allar ávísingar nú fara umvegis Kommunulæknaskipanina, og at øll innheintan av upplýsingum í mun til útgreinan nú liggur hjá kommunulæknunum.

Nakrir kommunulæknar gera greitt, at kommunulæknar eru væl førir fyri at ávísa til B&U psykiatriina. Aðrir vísa á, at teir ikki meta nýggi leisturin, við at kommunulæknin skal innsavna allar upplýsingar, er rætta leiðin at fara. Tá ið kommunulæknar ávísa til B&U psykiatriina, biður B&U psykiatriin um eina ørgrynnu av skjølum og upplýsingum, áðrenn ávísingin verður viðgjørd. Skjølini, ið verða umbiðin eru øll skjøl, ið stava frá dagstovninum ella skúlanum, kommunalu námsfrøðiligu ráðgevingini og Sernám, og eru at rokna sum námsfrøðilig skjøl, ið kommunulæknin bert skal savna inn og senda víðari. Uppgávan hjá kommunulæknanum er tí ikki longur einans at gera eina læknafakliga meting av, um barnið skal ávísast til útgreining, tí at ábending er um eitt nú autismu, men harumframt at innsavna eina rúgvu av skjølum frá øðrum pørtum. Í hesum sambandi vísa kommunulæknar á, at teir tá verða at meta sum ein skrivari hjá B&U psykiatriini.

Autismufelagið vísir á, at tá ið allar ávísingar skulu umvegis kommunulæknaskipanina so merkir hetta,

at um foreldur møta einum kommunulækna, sum ikki vil ávísa til B&U psykiatriina, so sita foreldrini føst í skipanini. Nakrir fólkaskúlar vísa á sama trupulleika, og greiða frá at teir tí biðja foreldrini venda sær til ávísar kommunulæknar, fyri at fáa barnið ávíst víðari. Kommunalar námsfrøðiligar ráðgevingar kenna somuleiðis til hendan trupulleika. Greitt verður frá, at tað er komið fyri, at teir hava ráðgivið foreldrum um at venda sær til kommunulæknan fyri at fáa barnið ávíst til B&U psykiatriina, og kommunulæknin hevur sýtt at gera hetta.

Á hoyringarfundinum við dagstovnar, vóru dagstovnar á einum máli um, at núverandi mannagongd við ávísing ikki er nøktandi. Teir ráðgeva allir foreldrunum, um at venda sær til kommunulæknan, men vísa á, at bíðitíðin er long og at hetta hevur við sær, at vegurin til at fáa hjálp er alt ov langur. Fleiri vísa á, at ábending ofta er um, at barnið mennist øðrvísi, tá ið barnið er í dagstovnaaldri, men vegna tað, at skipanin er stirvin og bíðitíðin long, so er barnið ofta farið í skúla áðrenn staðfest er um barnið hevur autismu. Nakrir meta, at tað hevði bøtt um støðuna um Gigni var innyvir børnini, tá ið tey gingu í barnagarði, eins og um fleiri sernámsfundir vóru, og hjálp var at heinta fyrr í tilgongdini. Fleiri vísa á, at tað er sum um tað er eitt „missing link" í teimum skipanum sum eru í dag.

Sernám upplýsir í hesum sambandi, at tey eisini meta, at tað hevði verið ynskiligt at havt fleiri sernámsfundir, eins og møguleika fyri at lofta teimum støðum, ið koma fram á fundunum, men hetta krevur at játtan er til endamálið.

Gigni upplýsir eisini, at tey eru klár til at víðka sítt virksemi, til eisini at fevna um eina heimavitjan, tá ið eitt barn er 3 ár, tá ið starvsfólk og játtan verður sett av til endamálið. Tá ið eitt barn er 3 ár, metir Gigni, at tað í stóran mun hevði verið týðiligt at sæð. um eitt barn hevur infantila autismu, og at ávísa til kommunulæknan í hesum sambandi.

Gigni metir tað somuleiðis vera óheppið, at teirra inngongd til Sernám er umvegis dagstovn ella skúla, og meta tey, at tað hevði gagnað familjunum betur, um Gigni kundi vent sær beinleiðis til Sernám, tá ið tey vóru stúrin um menningina hjá einum barni. Sernám kundi síðani eygleitt barnið nærri og ráðgivið familjuni. Gigni ynskir tí, at tey fingu egnu inngongd til Sernám.

Arbeiðsbólkurin metir út frá omanfyristandandi, at tað er greitt, at tað eru ósemjur um uppgávubýtið millum partarnar í ávísingartilgongdini. Harumframt eru ábendingar um, at tað eru uppgávur hesum viðvíkjandi, sum als ikki ella ikki í nøktandi mun verða loftaðar av verandi skipanum.

Við støði í hesum hevur arbeiðsbólkurin, saman við avvarðandi aðalstjórum, havt fund við teir tríggjar partarnar – Sernám, Kommunulæknar saman við Heilsutrygd og B&U psykiatriina – ið so ella so hava ein leiklut, tá ið eitt barn skal ávísast til útgreining. Út frá hesum fundi metir Arbeiðsbólkurin tað vera neyðugt, at politisk støða verður tikin til, hvør ella hvørji skulu ávísa til B&U psykiatriina, og hvussu uppgávubýtið skal vera millum partarnar. Tað er umráðandi, at partarnir verða inndrignir, soleiðis at verandi ivamál og spurningar verða svaraði áðrenn niðurstøður verða gjørdar. Neyðugt er samstundis at tryggja, at neyðug fígging verður sett av til hetta arbeiðið.

1. Mælt verður til, at politisk støða verður tikin til, hvør ella hvørji skulu ávísa til B&U psykiatri, og hvussu uppgávubýtið skal vera millum partarnar. Tað er neyðugt at kanna, hvør ella hvørji hava neyðugu førleikarnir til at ávísa. Neyðugt er samstundis at tryggja, at neyðug fígging verður sett av til hetta arbeiðið.

## 8. 2 Ráðgeving til dagstovnar, skúlar og foreldur

Arbeiðsbólkurin kann út frá hoyringartilgongdini staðfesta, at tað tykist vera heldur ógreitt fyri pørtunum hvør ráðgeving er tøk, og hvussu ábyrgdar- og uppgávubýti millum ymsu ráðgevingarskipanirnar er.

Í dag er ráðgevingin rundan um eitt barn við autismu sundurbýtt bæði ímillum geirar og stovnar.

Upprunaliga var tað uppgávan hjá B&U psykiatriini at undirvísa foreldrum og teimum nærmastu í autismu, eftir at barn teirra fekk staðfest autismu.

TGT-skipanin gjørdi greitt, at skúlar og dagstovnar fingu ráðgeving, men at eingin ráðgav familjunum. Tað gjørdist alt meira sjónligt at hendan ráðgeving vantaði og metingin var, at ráðgeving til familjurnar kundi bøta og lætta um í gerandisdegnum. Tí varð avgjørt at seta Heimaráðgevingina í Almannaverkinum á stovn, ið hevur til uppgávu at ráðgeva foreldrum og avvarðandi at børnum við autismu. Eftir at Heimaráðgevingin varð sett á stovn, bleiv avgerð tikin um at flyta uppgávuna at undirvísa foreldrunum í autismu úr B&U psykiatriini til Heimaráðgevingina í Almannaverkinum. Endamálið var at savna servitanina/frálæruna um autismu á einum stað.

Sostatt er ráðgeving rundan um eitt barn við autismu í dag skipað á tann hátt, at Heimaráðgevingin í Almannaverkinum ráðgevur og undirvísir familjunum og inni í heiminum, og Sernám ráðgevur dagstovnum og í skúlum, harundir førleikastovum. Harumframt ráðgeva førleikastovur eisini á skúlunum, kommunalu námsfrøðiligu ráðgevingarnar á dagstovnum, í teimum fýra kommununum, sum hava tilíkar. Sostatt kann ráðgevingin rundan um eitt barn verða veitt av 3-4 ymiskum stovnum ella geirum. Fleiri av hoyringarpørtunum hava víst á, at hetta kann vera óheppið, tí nøkur hava upplivað, at ráðgevingin ikki er samskipað og sampakkar, eins og at tað til tíðir kann vera ógreitt hvør ger hvat. Ráðgevandi uppgávan hjá pørtunum fevnir ikki bert um autismu, og tí fevnir henda avbjóðing um annað og meira enn málbólkin fyri hesa eftirmeting.

Autismufelagið greiðir frá, at foreldrini sum heild eru glað fyri Heimaráðgevingina frá Almannaverkinum. Autismufelagið vísir tó á, at starvsfólk í dagstovnum og skúlum stundum kunnu tykjast vita ov lítið um autismu og tí ikki duga nóg væl at lofta teimum trupulleikum, ið familjan/barnið hevur í skúlanum/dagstovninum. Somuleiðis vísa Autismufelagið, dagstovnar og skúlar á, at tað er ein trupulleiki, um ráðgevingin rundanum barnið ikki er samskipað. Ítøkiliga verður víst á, at ein vantandi samskipan kann hava við sær at ymiskar tilgongdir verða valdar í heiminum og í skúlanum/dagstovninum, og at hetta verður mett óheppið fyri børn við autismu.

Nakrir skúlar vístu á, at tað eftir teirra tykki kann vera gagnligt at fáa innlit í ráðgevingina, sum verður veitt í heiminum – í tann mun partarnir ynskja tað.

Autismufelagið vísir eisini á, at foreldur, ið hava barn á bíðilista til útgreining, javnan seta seg í samband við Autismufelagið, tí eingin ráðgeving er til tey í bíðistøðu. Tískil meta tey at ráðgeving manglar til foreldur, ið bíða eftir at barn teirra verður útgreinað.

Sernám hevur víst á, at tað kann vera ymiskt nær dagstovnar venda sær til ávikavist Sernám ella námsfrøðiligu ráðgevingina. Sjónarmiðið hjá Sernámi er, at um Sernám skal veita øllum kommunum somu tænastu, eiga tær eisini at verða viðgjørdar eins. Í teimum stóru kommununum verður veitt skipað námsfrøðilig ráðgeving í nærumhvørvinum til dagstovnarnar, meðan dagstovnar í øðrum kommunum, sambært Sernámi, ikki fáa staðbundna námsfrøðiliga ráðgeving. Sernámi vísir á, at nakrar kommunur veita hesa tænastu, meðan aðrar onga hava og at stovnarnir tí einans dúva á Sernám.

Kommunalar námsfrøðiligar ráðgevingar eru í dag skipaðar í fýra kommunum og eru vanliga mannaðar við námsfrøðingum ella starvsfólki við aðrari hægri námsfrøðiligari útbúgving. Námsfrøðiligu ráðgevingarnar hava víst á, at tað er ymiskt hvussu hesi økini skipa námsfrøðiligu ráðgevingina, og hvussu nógv starvsfólk eru knýtt at ráðgevingini. Víst verður á, at tað staðbundnu viðurskiftini kunnu vera ymisk eins og viðurskiftini á ítøkiligu stovnunum kunnu vera ymisk. Upplýst verður, at tað í summum økjum er námsfrøðiliga ráðgevingin, sum innanfyri ávísan fíggjarkarm játtar eyka tímar til stovnarnar, meðan tað í øðrum førum er stovnsleiðslan og/ella kommunala umsitingin, ið stendur fyri hesum. Skipanin við námsfrøðiligum ráðgeva er sostatt ikki ein kravd skipan, og í økjum uttan námsfrøðiligan ráðgeva liggja uppgávurnar hjá námsfrøðiligu leiðsluni á staðnum í samstarvi við kommunalu umsitingina. Í tørvandi mun velja summar kommunur eisini at keypa inn ráðgevaratænastur og førleikamenning frá privatum veitarum.

Arbeiðsbólkurin hevur fingið innlit í, at Barna- og útbúgvingarmálaráðið, saman við Kommunufelagnum, er farið undir eina tilgongd at nágreina uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur, tá ið talan er um ráðgeving á dagstovnaøkinum. Í hesum arbeiði skal ætlandi komast nærri einum greiðari ábyrgdarbýti millum land og kommunur, og at beina møgulig ivamál burtur um, hvør skal lyfta ávísar uppgávur mótvegis børnum, foreldrum og øðrum samstarvsfelagum. Væntanin er, at arbeiðið kann vera liðugt í inniverandi ári. Arbeiðsbólkurin metir, at arbeiðið er ein týðandi liður í at nágreina uppgávu- og ábyrgdarbýti, tá ið talan er um ráðgeving sum heild.

2. Mælt verður til at eitt greiðari uppgávu- og ábyrgdarbýti verður gjørt millum dagstovnaøkið, førleikastovur, Sernám, Heimaráðgevingina og B&U psykiatriina við tí endamáli at samskipa ráðgevingina um barnið.

## 8.3 Fyrsti fundurin eftir útgreining

Sum greitt frá omanfyri (sí pkt. 5.3.3), verður tann fyrsti fundurin, aftaná útgreiningina, altíð hildin hjá B&U psykiatriini.

Allir partar eru samdir um, at tað er ein góður og neyðugur fundur, har allir partar, sum eru um barnið, hittast. Tó vísir B&U psykiatriin á, at tað kemur fyri, at ov nógv fólk sita við borðið og hetta hava aðrir partar eisini nevnt. Víst verður á, at tað besta fyri familjuna er, at tað eru tey, sum kenna barnið, og eru um barnið í gerandisdegnum, og sum kunnu lofta problematikkunum og bjóða inn við loysnum, ið møta á fundinum. Eisini er tað best um allir partar umhugsa at senda so fá umboð sum til ber teirra vegna.

Í sambandi við hoyringarfundin við skúlarnir varð víst á, at tey verða innkallaði til ein netfund í B&U psykiatriini, men fáa ikki at vita, hvat fundurin snýr seg um, fyrrenn tey møta á fundinum, og vita tí heldur ikki um talan er um, at viðkomandi barn hevur fingið staðfest autismu. Tá er fatanin hjá skúlunum, at teir verða bidnir um at koma við einari lýsing av, hvat skúlin kann bjóða barninum/familjuni, uttan at tey hava havt møguleika at fyrireika seg frammanundan. Umboð fyri skúlarnar vístu eisini á, at tað er tilvildarligt um skúlin fær útgreiningina ella niðurstøðurnar í útgreiningini, ið staðfesta um talan er um autismu. Tey vísa á, at tey hava tørv á at fáa niðurstøðurnar, so tey vita hvørja diagnosu talan er um, og fáa fyrireika seg til fundin.

Til hetta sigur B&U psykiatriin, at tá innkallað verður til fyrsta TGT fund, gera tey eina meting av, hvørjir partar eru viðkomandi at luttaka á fundinum í mun til TGT samstarvsavtaluna. B&U psykiatriin er av tí fatan at tað gevur góða meining, at partarnir hava møguleika at fyrireika seg til fundin. Tað hevur tó ikki verið siðvenja, at sjálv frágreiðingin verður send skúlunum. Sernám fær altíð frágreiðingina sendandi, og tað verður væntað av B&U psykiatriini, at umboð frá Sernám gjøgnumganga innihaldið við skúlan. Sernám upplýsir í hesum sambandi, at hendan væntanin er ókend fyri Sernám, og at hetta ikki er mannagongdin í dag. Sernám vísir tó á, at tey ofta hava hetta samskifti við skúlan og møguliga saman við foreldrunum, men at hetta er eftir fyrsta fundin. Viðvíkjandi um skúlin skal hava útgreiningina/niðurstøðurnar sendandi sigur B&U psykiatriin, at tað hevur ikki verið vanligt, at sjálv frágreiðingin fer til skúlan. Um skúlin hevur eitt ynski um at kenna sjálva diagnosuna áðrenn fundin, so metir B&U psykiatriin, at hetta eigur at lata seg gera, um foreldrini samtykkja til hetta. Hetta um so er, at tað ikki er greitt, at talan er um ein TGT fund, sum jú altíð hevur støði í eini autismu diagnosu.

Barnaverndartænasturnar vísa á, at tær verða innkallaðar til fyrsta fundin um B&U psykiatriin metir tað verða neyðugt, her er eisini talan um mál, sum barnaverndartænasturnar ikki kenna til. Tær eftirspyrja eina mannagongd fyri nær tær verða innkallaðar, og tað má verða greitt, hví tær verða innkallaðar, tí um barnaverndartænastan kemur við á ein fund, verður málið viðgjørt sum eitt barnaverndarmál og tá verður í fyrstu atløgu hugt at foreldraførleikanum.

Gigni vísir á, at tey í fleiri førum fáa innkalling til fyrsta fundin í B&U psykiatriini, men eru ikki

ein partur av málinum eftir fundin. Hinvegin vísa námsfrøðiligu ráðgevingarnar hjá kommununum á, at tær bert verða bodnar við umvegis dagstovnin ella foreldrini. Hetta meta tær vera óheppið í og við at tey eru tætt knýtt at bæði dagstovni og foreldrum og játta tímar um barnið hevur tørv á hesum.

Til hoyringarfundin vísti Sernám á, at tann fyrsti fundurin er týdningarmikil, men at tað eigur at vera hugt upp á, hvat endamálið við fundinum er og hvør skal luttaka á fundinum. Sernám vísir eisini á, at tey ikki meta, at tað er neyðugt hjá teimum at verða til staðar, tá ið talan er um eina gjøgnumgongd av einari útgreining frá B&U psykiatriini, tí tað duga teirra starvsfólk at gjøgnumganga sjálvi. Men Sernám eftirlýsir fakliga sparring á hesum fundi.

Sum eisini víst á omanfyri, so er B&U psykiatriin samd í, at á summum fundum eru ov nógvir luttakarar og at umhugsast kann at seta mark fyri, hvussu nógv kunnu luttaka frá hvørjum stovni. B&U psykiatriin vísir eisini á, at tá talan er um autismu uttan komorbiditet, er leikluturin hjá B&U psykiatriini ofta avmarkaður aftaná, at diagnosan er staðfest. Hesi børn eiga at verða hjálpt í nærumhvørvinum, tætt uppá teirra gerandisdag, og tí metir B&U psykiatri at tað er sentralt at samstarvsfelagar, sum t.d. Sernám, luttaka á fundinum, soleiðis at fortreytirnar fyri yvirlevering best kunnu tryggjast og tørvurin hjá barninum verður møttur.

Samanumtikið metir arbeiðsbólkurin, at tann fyrsti fundurin aftaná útgreiningina, er ein góður og neyðugur fundur, har allir partar, sum eru um barnið, hittast, og útgreiningin verður løgd fram. Tað er á hesum fundi, at foreldur vera sett í samband við samskiparan fyri fyrstu ferð, og møta teimum pørtum, ið frameftir fara at hava ein leiklut í, at teirra barn fær ta hjálp, ið er tøk.

Harumframt vísir omanfyri standandi, at partarnar ikki eru heilt greiðir yvir, nær teir verða bodnir við, hvørjar orsøkir eru til tess, og hvønn leiklut teir skulu hava á fundinum. Eisini eru partar, ið ynskja meira kunning áðrenn fundin, so møguligt er at fyrireika seg. Arbeiðsbólkurin metir tað vera neyðugt, at B&U psykiatriin ger sær greitt, hvør skal luttaka á fundinum, so tað í størst møguligan mun eru tey, ið hava ein virknan leiklut í lívinum hjá barninum, og tí kunnu hjálpa barninum og familjuni eftir útgreining. Harumframt metir arbeiðsbólkurin, at tað kann gagna barninum, um allir partar hava møguleika at fyrireika seg til fundin.

**3.** Mælt verður til, at B&U psykiatriin tryggjar, at tey, sum luttaka á fundinum í størst møguligan mun eru tey, sum frameftir hava ein virknan leiklut í lívinum hjá barninum.

**4.** Mælt verður til, at B&U psykiatriin í størst møguligan mun tryggjar, at partarnir vita, at talan er um ein TGT fund áðrenn fundin, og tekur støðu til hvør kann og hvør skal hava útgreiningina/niðurstøðurnar áðrenn fundin.

## 8.4 TGT-fundirnir í Almannaverkinum

Sum greitt er frá omanfyri, er tað Almannaverkið, sum hevur samskipandi leiklutin og skipar allar fundir í samstarvinum, eftir fyrsta fundin í B&U psykiatriini.

Flest allir partar eru samdir um, at tá ið fundir hava verið har allir partar, sum kenna barnið, møta og avtalur um loysnir verða gjørdar, er talan um ein væleydnaðan fund. Almannaverkið vísir eisini á, at tá allir partar møta til fundin, er talan um ein góðan og konstruktivan fund, har mál kunnu setast, sum øll kunnu arbeiða víðari við.

Tó vísa fleiri av pørtunum á, at tað eru avbjóðingar við fundunum, og at tørvur er á tillagingum. Her verður serliga nevnt, at tað ikki altíð eru tey somu, sum luttaka á fundunum, og at tey, sum luttaka, ikki altíð kenna barnið. Eisini verður víst á, at avtalurnar, sum verða gjørdar á fundunum, ikki altíð verða hildnar, ella at tað manglar kunning til partarnir, um at tað, sum er avtalað, ikki kann lata seg gera. Harvið verður ofta tosað um tað sama á fundinum árið eftir.

Í summum førum verður mett, at tað er ov leingi,

at tað er eitt heilt ár í millum fundirnir og í øðrum førum verður mett, at tað ikki er neyðugt at hava fundir hvørt ár, men heldur at skipa fundirnir í teimum týdningarmiklu skiftunum í lívinum hjá barninum.

Nakrir partar vísa á, at tað kann vera ein avbjóðing, at B&U psykiatriin ikki er við á teimum árligu fundunum. Eisini verður víst á, at í onkrum førum eru B&U psykiatriin biðin um at koma á fund, tí at foreldrini meta tað vera neyðugt, men at tey ikki møta. Harumframt verður víst á, at tað er ein avbjóðing at Sernám ofta ikki møtir á árligu fundunum og sum lýst omanfyri, at fundir vera avlýsir um Sernám boðar frá at tey ikki luttaka.

Sum áðurnevnt verða fundirnir hildnir í mánaðinum, tá ið barnið hevur føðingardag. Hetta kann hava ávísar avbjóðingar við sær fyri tey børn, sum fylla í juli og august. Autismufelagið vísir á, at tað er komið fyri at børn sum fylla hesar mánaðir verða „gloymd".

Ein onnur avbjóðing við at hava fundirnir í mánaðinum barnið fyllir er, tá ið neyðugt er at viðgera og samskipa støður í lívinum hjá barninum, sum eru tongdar at ávísum tíðum á árinum og hetta ikki er tætt at føðingardegnum hjá barninum. Sum dømi kann nevnast, at tá ið barnið skal byrja í skúla, fer fyrireikandi arbeiðið í gongd um heystið árið fyri. Tá uppliva foreldur, at tað kann vera ov seint ella ov tíðliga at viðgera skúlabyrjan á einum TGT-fundi um hesin t.d. liggur ímóti sumri. Sernám vísir á at tað kemur fyri at tey longu hava havt ein fund við foreldur um skúlabyrjan, tá ið evnið verður umrøtt á TGT-fundi, við tað, at hesir eru lagdur eftir føðingardegnum hjá barninum.

Undirvísingarstýrið vísir á, at tað kemur alt ov ofta fyri, at børn koma í skúla og at skúlin er ófyrireikaður og ikki er kunnaður um serlig atlit, eiga at verða tikin at barninum. Ein fundur, ið fyrireikar hetta skiftið, kann vera við til at tryggja at skúlin fær neyðuga kunning til at taka ímóti barninum á rætta hátt.

Eitt, sum fleiri partar eisini vísa á er, at tað, eins og á fyrsta fundinum, kemur fyri, at ov nógv fólk luttaka á eftirfylgjandi fundum og tað kann í ávísum førum vera ov nógv fyri familjuna. Í hesum sambandi verður víst á, at tørvur er á at taka støðu til, hvør skal luttaka á hesum fundunum. Autismufelagið metir tó ikki, at hetta er ein stór avbjóðing hjá foreldrunum, við tað at samskiparin avtalar við foreldrini, hvør skal luttaka á fundinum. Tað kann tó koma fyri, at ein partur sendir fleiri fólk at umboða seg á fundinum óneyðugt, og tí er tað umráðandi at partarnir gera eina ítøkiliga meting av hvør skal luttaka á fundinum, teirra vegna.

Námsfrøðiligu ráðgevararnir hjá kommununum vísa á, at teir bert verða bodnir við um dagstovnurin metir, at tørvur er á teimum. Í og við at tað er kommunan, sum skal skipa eitt nøktandi dagstovnatilboð til barnið, og eisini ráðgevur dagstovnum og foreldrum í hesum sambandi, meta teir seg vera ein týðandi luttakara á fundunum. Teir meta, at verandi mannagongd ofta ger, at teir verða gloymdir og ynskja tí at mannagongdin verður broytt soleiðis, at kommunalar námsfrøðiligar ráðgevingar altíð fáa innbjóðingar beinleiðis, tá ið barnið gongur á dagstovni og barnið býr í einum av teimum fýra kommunum, ið hava námsfrøðiligar ráðgevingar.

Gigni vísir somuleiðis á, at tey ynskja at núverandi mannagongd verður broytt soleiðis at heilsufrøðingar ikki bert fáa innbjóðingar umvegis skúlar, men at innbjóðing verður send beinleiðis til Gigni í teimum førum, tað er viðkomandi.

Almannaverkið vísir á, at tað er týdningarmikið at fáa greiðu á, hvørjir partar skulu luttaka og hvørjir partar kunnu luttaka á fundunum, so einki ivamál er, hesum viðvíkjandi.

### 8.4.1 Fundir í skiftum

Tá ið TGT fór í gongd í 2015, varð ein meting gjørd av, hvussu nógvar familjur høvdu tørv á einum samskipaðum tilboði frá almennu geirunum. Tá vísti Almannaverkið á, at tað hevði samband við áleið 80 familjur, men at tað nokk vóru millum 150 og 200 familjur, sum høvdu ein tørv. Í dag eru yvir 250 familjur knýttar at TGT. Hetta hevur við sær eitt ávíst trýst á skipanina, fyri at megna at halda allar fundir við partarnir.

Almannaverkið og Sernám eru komin við uppskoti

um at broyta leistin í TGT, soleiðis at fundirnir eru í stóru skiftunum hjá børnunum.

Almannaverkið vísir á, at í nógvum málum er ikki neyðugt at halda fundin á hvørjum ári. Tey uppliva ov ofta, at tá ið samskiparin ringir til foreldrini og bjóðar teimum ein fund siga foreldrini, at alt gongur gott, men hóast hetta ynskja tey ein fund, tá ið tey nú fáa tað bjóðað. Almannaverkið metir ikki, at tað er neyðugt at halda fund, tá ið støðan er góð, og ongar avbjóðingar eru í gerandisdegnum. Tað kundi tí givið meining um fundir blivu hildnir ávís tíðarskeið í lívinum hjá barninum, har einhvør broyting er í gerandisdegnum, ella har aldurin á barninum er viðvirkandi til, at broytingar eru hjá barninum. Tað eru ofta skiftini, ið serliga eru trupul hjá børnum við autismu, og er tað eisini tá, tað er eyka tørvur á samskipan.

Eins og Almannaverkið metir Sernám, at tað ikki er neyðugt við árligum fundi hjá øllum børnum. Sernám heldur tað vera skilagott at halda færri og meiri málrættaðar fundir.

Sum dømi upp á fundir í skiftum, umframt fundin í B&U psykiatri, kundi verið, tá barnið fekk staðfest autismu, frá barnagarði í skúla, frá grunddeild til miðdeild, frá miðdeild til hádeild, og tá barnið er liðugt í fólkaskúlanum, og tá ið barnið gert vaksið. Eisini kann eitt týðandi skifti vera tá ið barnið skiftir skúlatilboð, ella flytir frá einum skúla í ein annan.

Arbeiðsbólkurin hevur til hoyringarfundirnar tosað við partarnar um uppskotið at hava fundir í skiftum og ikki árliga. Partarnir eru ymiskir á máli um henda leist, tí mett verður, at nøkur mál eru serliga trupul, og tí hava tørv á meira samskipan, enn hesin leistur leggur upp til.

Á hoyringarfundi við umboðum fyri Undirvísingarstýrið og fólkaskúlar, harundir serskúlatilboð og førleikastovur, varð tikið undir við, at halda TGT-fundir í skiftum, heldur enn árliga, hóast einstakir skúlar mettu tað vera gagnligt at hava árligar fundir. Víst varð tó á, at tað er neyðugt at hava fundin *áðrenn* skiftini – við tí endamáli at fyrireika skiftið. Semja var eisini um, at tað er skilagott um samskiparin hevur árligt samband við foreldrini, so truplar støður kunnu loftast. Sernám er samt við hesum. Almannaverkið vísir tó á, at tað eru fyrimunir og vansar við at hava fundin áðrenn eitt skifti, við tað at tað eisini er tørvur á, at tey, sum eru um barnið eftir eitt skifti, tosa um avbjóðingar í gerandisdegnum. Tí er umráðandi, at partarnir, í felag, umrøða hvat er besta loysnin.

Kommunalu námsfrøðiligu ráðgevingarnar og barnaverndartænasturnar mettu, at tað má vera upp til foreldrini at svara, um tað er nøktandi bert at hava fundir í skiftum. Tó vísa kommunalu námsfrøðiligu ráðgevingarnar á, at tað er umráðandi at hava fundir í skiftum, tá ið tað eru hesi, ið eru týdningarmiklast, og har foreldrini serliga eru stúrin. Barnaverndartænasturnar vísa á, at í teimum málum tær eru ein partur av, kann tað vera ov sárbært, bert at hava fundir í skiftum. Hesi málini kunnu tó hugsast at vera trupul mál, sum í størri mun krevja samskipan.

Samanumtikið meta fleiri partar at tað kundi verið skilagott at havt fundir í skiftum. Tó verður spurnartekin sett við, hvussu so verður við teimum børnum og familjum, sum hava ein størri tørv.

Autismufelagið heldur, at tað er ymiskur tørvur hjá familjunum. Hjá summum familjum gongur tað væl og hava tey í minni mun tørv á samskipan árliga. Hjá øðrum familjum er støðan truplari og er tørvurin á fundi tí størri. Um mannagongdin verður broytt til at hava fund í skiftum, so metir Autismufelagið, at samskiparin skal seta seg í samband við foreldrini einaferð um árið og hoyra um støðuna hjá barninum. Hetta kann til dømis gerast við at samskiparin, eins og í dag, ringir til familjuna árliga, men ístaðin fyri at bjóða teimum ein TGT-fund, spyr samskiparin inn til hvussu gongur hjá familjuni og barninum. Í samrøðuni kann samskiparin tá fáa innlit í um eitt týðandi skifti er í lívinum hjá barninum, ella um tørvur er á eyka fundi uttanum skiftini. Harvið heldur samskiparin fram við at hava árligt samskifti við foreldrini, eins og í dag, men bjóðar bert inn til fund í skiftum, og tá ítøkiliga støðan hjá familjuni talar fyri hesum. Um hetta verður mannagongdin, er neyðugt, at tað verður greitt hvat útloysir ein eyka fund, og at partarnir binda seg til at møta í teimum førum samskiparin og foreldrini meta tað viðkomandi.

B&U psykiatriin vísir eins og Autismufelagið á, at um man velur at brúka leistin við fundum í skiftum, so er tað neyðugt at samskiparin setir seg í samband við familjuna, fyri at vita um tørvur er á fundi, meira enn bert í skiftum. B&U psykiatriin metir at í summum førum eru foreldur ofta ovbyrjað og hava kanska ikki fult yvirlit yvir støðuna hjá barninum og tí ikki halda at tað er tørvur á fundi. Tí mæla tey til, at samskiparin skal spyrja foreldrini, um hann kann seta seg í samband við hinir partarnar, sum eru um barnið, fyri at spyrja um støðuna, um samskiparin metir at tørvur er á hesum.

## 8.5 Samanumtøka

Arbeiðsbólkurin hevur viðgjørt omanfyri standandi, og er samdur um at tað er neyðugt at endurskoða leistin fyri TGT fundirnar. Mett verður neyðugt at halda færri og meira málrættaðir fundir, ið taka útgangsstøði í skiftinum hjá barninum. Samstundis verður mett neyðugt, at støða skal takast til hvørjir partar skulu og hvørjir kunnu luttaka til hvørt skiftið, eins og at innihaldið á fundinum og tíðspunktið fyri fundin má nágreinast í mun til hvørt einstakt skiftið. Arbeiðsbólkurin metir, at talið av skiftum, luttakarar, innihaldið eins og hvussu hetta skal skipast í praksis, má gerast saman við teimum stovnum, sum eru partar av TGT, umframt Autismufelagnum.

Arbeiðsbólkurin er greiður yvir, at støðurnar hjá familjunum eru sera ymiskar og at ein minking í fundarvirkseminum kann gera, at tey, ið hava største tørvin á samskipan, kunnu detta niður ímillum. Arbeiðsbólkurin metir, at ein háttur at fyribyrgja tílíkar støður, er at samskiparin framhaldandi hevur árligt samband við familjuna, og út frá hesum ger eina meting av støðuni. Um tað í samskiftinum við familjuna gert greitt at tørvur er á samskipan millum ymsu stovnarnar, skal samskiparin síðani taka stig til heilt ella partvís at samla toymið rundanum barnið til ein fund, hóast talan ikki er um eitt skifti. Arbeiðsbólkurin metir, at leisturin fyri hvussu hetta skal skipast í praksis, má gerast saman við pørtunum, sum luttaka í TGT, umframt Autismufelagnum.

5. Mælt verður til, at TGT fundir vera í týdningarmiklu skiftunum hjá børnunum. Mælt verður til at partarnar í felag nágreina skiftini, innihaldið á fundinum, tíðspunktið fyri fundirnar og luttakarar.

6. Mælt verður til, at samskiparin framhaldandi hevur árligt samband við foreldrini um støðuna hjá barninum og út frá hesum metir, um tørvur er á eyka samskipan, og harvið eyka fundi, í millum skiftini. Nágreinast skal, hvat útloysir eyka fund og í hvørjum førum, hini í toyminum um barnið, kunnu venda sær til samskiparan um eyka fund. Útgangsstøðið má vera at talan er um tørv á samskipan.

7. Mælt verður til, at Almanna- og mentamálaráðið skipar fyri einum arbeiðsdegi, har avvarðandi partar sita saman og viðgera og nágreina hvussu nýggi leisturin í TGT skal skipast í praksis.

# 9. Aðrar tillagingar í mun til fundir

## 9.1 Tannárini – vaksnamanna tilveran

Almannaverkið skjýtur upp at ein tillaging verður gjørd í TGT, soleiðis at tann ungi sjálvur fær møguleika at luttaka á fundinum, tá ið tann ungi er ávikavist 16 ella 17 ár, í teimum førum har tann ungi megnar hetta. Mett verður, at tað er týdningarmikið at hoyra hvat tann ungi sigur um sína framtíð, tí viðkomandi ofta hevur gjørt sær tankar um framtíðina. Samstundis verður víst á, at um tann ungi skal luttaka, er umráðandi, at hædd verður tikin fyri, um øll, sum eru um tann unga, skulu luttaka, við tað, at hetta kann verða ov nógv fyri summi av hesum ungu.

Á hoyringarfundi við Autismufelagið varð hesin møguleikin umrøddur, og var felagið samt við Almannaverkinum í, at hetta er eitt gott hugskot. Tá ið tann ungi megnar og ynskir at luttaka, kann tann ungi, saman við foreldrunum, ella avvarðandi, samstundis gera greitt fyri samskiparanum, hvørjir partar tey ynskja skulu luttaka, og um talið av luttakarum skal avmarkast.

**8.** Mælt verður til, at tann ungi verður boðin at luttaka á fundum í viðkomandi skiftum, og at tað verður nágreinað, hvørji skifti talan er um, á arbeiðsdegi millum partarnar.

## 9.2 Talgild luttøka

Sernám og Undirvísingarstýrið meta, at tað kundi verið eitt hugskot at brúkt online-fundir meira, og tað hevði helst verið møguligt hjá Sernámi at luttikið á fleiri fundum, um tað ikki var krav um fysiskan fund. Fyrsti fundurin eigur tó at haldast fysiskt. Harumframt vísa nakrir skúlar eisini á, at tað hevði verið ynskiligt at kunna luttikið á fundinum talgilt, tað hevði gjørt tað møguligt hjá skúlunum at møtt við røttu starvsfólkunum á fleiri fundum enn í dag. Serliga viðmerkja skúlar, at tað er viðkomandi at luttaka talgilt í t.d. Vágunum, við tað at hesi higartil ikki hava havt møguleika fyri at hava fundin á oynni. Almannaverkið er av tí fatan, at endamálið við fundinum verður best rokkið um partarnir møta fysiskt á fundinum.

**9.** Mælt verður til, at man í størri mun tekur atlit til landafrøðiligu og praktisku viðurskiftini hjá pørtunum, harundir nær og um tað skal vera møguligt at luttaka talgilt, ella um tað í fleiri førum skal vera møguligt at hava fundin lokalt.

## 9.3 Møgulig víðkan av aldursbólkinum, sum kann fáa lut í TGT

Verandi skipan við TGT fevnir, sum nú er, um børn og ung, til hesi gerast 18 ára gomul. Í hoyringartilgongdini hevur Autismufelagið víst á, at TGT átti at verið smidligari, viðvíkjandi, hvussu leingi ung kunnu vera tongd at hesi skipan. Mett verður at møguleiki eigur at vera fyri einum bleytari skifti til vaksnamannatilveruna, í einum tryggum og kendum umhvørvi.

Víst verður á, at tað er ein rættiliga týðandi broyting, sum hesin 18 ára føðingardagur kann hava við sær, og at tað tí er umráðandi at hetta verður loftað rætt. Frá tí degi skal viðkomandi nevniliga sjálvur standa við ábyrgdini av øllum samskifti við allar hugsandi myndugleikar. Sum dømi kunnu nevnast skúli, kommuna, heilsu- og almannaverk, sum øll kunnu hava stóra ávirkan á framtíðina hjá hesum unga, sum nú skal standa á egnum beinum.

Frá, at hava verið í TGT, skal hesin ungi frá degi til

dags, megna at hava yvirlit yvir øllum, sum foreldrini, saman við TGT-toyminum, áðrenn kundu leiðbeina um. Samstundis vísir gransking, at ung við autismu mennast seinni enn javnaldrandi, og hava tey tí ofta tørv á stuðlandi fyriskipanum longri enn onnur.

Ungdómar við autismu eru og kenna seg ofta øðrvísi í flestu viðurskiftum, samstundis sum fleiri teirra ikki altíð sjálvi duga at síggja seg hava tørv á stuðli eftir 18 ára aldur, hóast tørvurin, sæddur úti frá, er eyðsýndur. Tískil verður víst á, at ein víðkan av TGT í stóran mun kann stuðla teimum á leiðini til at gerast vaksin.

Autismufelagið vísir á, at ein smidligari aldursmark fyri TGT, m.a. kann havt eina jaliga ávirkan á útbúgvingarmøguleikarnar hjá ungum við autismu. Ung við autismu, kunnu hava trupult við at megna eina vanliga skúlagongd. Hetta hevur við sær, at fleiri teirra gerast munandi seinni liðug við fólkaskúlan, enn vanligt, um tey yvirhøvur gerast liðug. Orsøkirnar til hetta kunnu vera mangar og ymiskar, av tí at autismuspektrið spennir víða, serliga tá metast skal um tørvin á stuðli, til at megna bæði skúlagongd og at taka hond um egið lív í síni heild, við allari tí ábyrgd, hetta hevur við sær.

Eitt nú í skúlahøpi, kann ein víðkan av TGT tí verða ein stór hjálp, tí tá er talan um eitt toymi, sum longu kennir tann unga og tískil hevur uppbygt neyvan kunnleika til tey ynski og avbjóðingar, sum standa fyri framman. TGT kann tá viðvirka til, at fleiri ung megna at fáa fólkaskúlaprógv og koma víðari á eina ungdómsútbúgving, tað veri seg vanliga miðnámsútbúgving, Autismuflokk, Serligt Skipað Miðnám, lærupláss ella annað.

Samanumtikið metir arbeiðsbólkurin, at tað kann verða skilagott fyri tann einstaka, um tað er møguligt at fáa eyka fund í ávísum førum, eftir at tann ungi er fyltur 18 ár, Hetta kann til dømis vera í teimum førum, har tann ungi enn ikki er farin víðari í skúla ella komin út á arbeiðsmarknaðin ella í aðra fyriskipan. eftir fólkaskúlan. Eisini verður mett at vera viðkomandi við fundi eftir 18 ára aldur, tá ið hetta kann tryggja eitt trygt skifti innanhýsis í Almannaverkinum, við tað, at tað ikki eru somu deildir og fyriskipanir um persónin, áðrenn og eftir 18 ára aldur.

Arbeiðsbólkurin er tó vitandi um, at ávísar forðingar kunnu vera í mun til hvussu skipanirnar eru í dag, m.a. at tú fert frá at vera barn til at vera vaksin og tá eru tað aðrar skipanir, sum taka yvir.

**10.** Mælt verður til at lýsa møguleikan fyri at víðka skipanina til, í ávísum førum, at fevna um ung, sum eru fylt 18 ár, hvussu hetta kann skipast og hvat ein tílík skipan kostar.

## 9.4 Møgulig víðkan av samskiparaleiklutinum

Sum víst á í samanumtøkuni av samskiparaleiklutinum (sí pkt.6.2.), metir arbeiðsbólkurin, at samanumtikið virkar samskiparaleikluturin sambært upprunaliga endamálinum. Hóast flest allir partar eru samdir við hesum, og meta at samskipanarleikluturin liggur væl hjá Almannaverkinum, so eru ábendingar um, at partarnir hava ymiskar fatanir av, hvat uppgávan hjá samskiparanum er og eigur at vera.

Hetta kom millum annað til sjóndar, við at nakrir partar seta spurnartekin við, um leikluturin hjá samskiparanum átti at verið øðrvísi.

Sum dømi kann nevnast, at Sernám vísir á, at tað hevði verið ynskiligt um samskiparin í Almannaverkinum eisini hevði kunnleika til hvussu aðrar skipanir arbeiða. Eisini er fatanin hjá barnaverndartænastunum, at tað ofta manglar samskipan av fyriskipanum gjøgnum árið. Tær vísa á, at tað eru nøkur mál, ið ikki kunnu bíða til næsta árliga TGT-fund, til dømis at fáa eitt barn inn aftur í skúlan, og at tað tí kemur fyri, at barnaverndartænastur innkalla til netverksfundir parallelt við TGT. Í tílíkum førum meta barnaverndartænasturnar, at tær koma til at yvirtaka samskipandi leiklutin hjá familjunum – til dømis í mun til skúlaviðurskifti – ið annars ikki hoyrir undir teirra arbeiðsøkið.

Fleiri partar meta, at tørvur er á at víðka samskiparaleiklutin, so at samskiparin, umframt at skriva uppgávur, avtalur og ábyrgdarbýti í virkisætlanina á hvørjum fundi, eisini skal fylgja upp uppá tað, sum verður avtalað á fundinum.

Autismufelagið vísir á, at hóast avtalur og uppgávur verða avtalaðar á fundinum, og skrivaðar í virkisætlanina, so vera hesar ikki altíð framdar í verki, hóast ásett er hvør partur eigur at fremja hesa. Í hesum førum hoyra foreldrini ofta einki aftur frá pørtunum. Tí eru tey sjálvi noydd til at fylgja væl við eftir fundin, og uppliva, at tey mugu rykkja fleiri ferðir, fyri síðani sjálvi at loysa uppgávurnar, tá ið avtornar. Hetta er ikki í tráð við endamálið við TGT, sum jú var, at foreldrini skuldi hava lættari við at koma í samband við myndugleikar, umframt at foreldrini ikki sjálvi skuldu venda sær til ein myndugleika fyri, og annan eftir, fyri at vísa á trupulleikarnar. Autismufelagið ynskir tí, at samskiparaleikluturin verður víðkaður til eisini at skula fylgja upp eftir fundin, og soleiðis tryggja, at tað, sum avtalað er, verður gjørt. Um tað síðani vísir seg at avtalurnar ikki kunnu setast í verk, so kann samskiparin tá tryggja at foreldrini fáa at vita, hvat kann lata seg gera ella ikki, áðrenn næsti fundur verður árið eftir.

Fleiri dagstovnar og skúlar vísa somuleiðis á, at tað ov ofta kemur fyri, at góðar og neyðugar avtalur vera gjørdar á fundinum, sum ikki vera fylgdar, og at fundir tá eru ov nógv merktir av endurtøkum. Greitt verður frá, at ein skipan, sum TGT kann lætta nógv um lívið hjá hesum familjum, um partarnar gera sum avtalað er á fundinum. Mett verður, at tað hevði bøtt um støðuna hjá familjunum, um fylgt varð upp uppá avtalurnar eftir fundirnar.

Bæði Sernám og nakrar barnaverndartænastur vísa somuleiðis á, at tað er viðkomandi at umhugsa, um samskiparaleikluturin skal víðkast til eisini fylgja upp uppá avtalurnar, fyri at tryggja gongdina í málunum. Harumframt meta hesi, at tað er ógreitt hvør leikluturin hjá samskiparanum er, uttanum árligu fundirnar.

Almannaverkið er samt í, at tørvur er á at fylgja upp uppá avtalur, sum eru gjørdar á TGT fundum. Eisini metir Almannaverkið, at tað vildi verði gagnligt um samskiparin hevði ein virknari leiklut millum fundir. Í hesum sambandi vísir Almannaverkið tó á, at tað er avmarkað hvat ein samskipari kann gera við myndugleikar, sum ikki halda sínar avtalur. Endamálið við TGT var, at allir partar taka ábyrgd fyri sínum egna øki og harvið tryggja, at avtalur verða hildnar. Eingin geiri ella stovnur hevur heimild at áleggja øðrum stovni uppgávur og tí er torført hjá einum parti at hava ábyrgdina av at fylgja upp upp á avtalur.

Arbeiðsbólkurin skal vísa á, at hvør geiri hevur ábyrgd á sínum øki, og at geirarnir ikki kunnu áleggja hvørjum øðrum uppgávur. Harumframt er ætlanin við TGT at samskipa tænastuna rundanum barnið og er tað tí framvegis hvør stovnur sær, sum hevur ábyrgdina av at fremja tær uppgávur og avtalur á egnum øki, sum semja er um á fundinum.

Um samskiparaleikluturin skal víðkast til at samskiparin hevur ein virknari leiklut í millum fundirnar, so má hetta gerast við tí fyrivarni, at samskiparin ikki kann áleggja øðrum stovnum at halda sínar avtalur.

Arbeiðsbólkurin metir, at um samskiparaleikluturin skal víðkast til eisini at fylgja upp eftir fundir, so kann ein leistur vera, at tíðarfreistir verða settar á uppgávurnar og avtalurnar, sum verða gjørdar á fundinum og at partarnir binda seg til at venda aftur til samskiparan, innan ásettu tíðarfreist og kunna um, um avtalan er avgreidd ella um uppgávan av ymiskum orsøkum ikki kann fremjast. Um partarnir ikki venda aftur, kann samskiparin, venda sær til partarnar vegna foreldrini.

11. Mælt verður til, at tað formliga verður staðfest, at Almannaverkið hevur samskiparaleiklutin og at hesin verður nágreinaður, so at tað gerst greitt fyri øllum pørtum hvør uppgávan og leikluturin hjá samskiparanum er.

12. Mælt verður til, at fylgt verður upp eftir fundir, og at uppgávu- og ábyrgdarbýti verður avtalað á arbeiðsdegi millum partarnar.

## 9.5 Mannagongd fyri tillagingum

Arbeiðsbólkurin staðfestir, at ein røð av tillagingum og broytingum eru gjørdar í TGT, síðani hon varð sett í verk 1. januar 2015. Úrslitið er, at TGT í dag ikki er í samsvari við tað, sum er lýst í faldaranum

um skipanina. Staðfestast má eisini, at tað hevur verið misjavnt, hvussu hesar broytingar eru framdar. Summar broytingar eru lagdar fyri og góðkendar av stýrisbólkinum, meðan aðrar eru framdar millum ávísar partar sínámillum, ella av ávísum parti av sínum eintingum. Harumframt er gjørt greitt fyri arbeiðsbólkinum, at tað er komið fyri at allir partar ikki hava fingið kunning um góðkendar broytingar.

Almannaverkið vísir á, at partar av TGT-samstarvinum venda sær til teirra, við áheitanum um broytingar í TGT-avtaluni. Tørvur er á, at tað er greitt tilskilað hvønn man skal venda sær til, eru avbjóðingar ella ynskir um broytingar í TGT avtaluni.

Tá ið tillagingar vórðu gjørdar í 2017, varð samstundis avtalað, at Almannaverkið skuldi gera eina støðufrágreiðing 2. ferðir árliga, ið skuldi viðgerast av táverandi arbeiðsbólki og stýrisbólkinum, Stýrisbólkurin skuldi síðani taka støðu til um broytingar skuldu gerast og um neyðugt varð við politiskari støðutakan. Almannaverkið hevur sent Almanna- og mentamálaráðnum (tá Almannamálaráðnum) hesar støðufrágreiðingar, men arbeiðsbólkurin hevur ikki funnið fram til nakað, sum vísir, at hesar eru blivnar viðgjørdar av táverandi arbeiðsbólki ella í stýrisbólkinum.

Arbeiðsbólkurin metir tað vera óheppið, at ongin fastur leistur er fyri broytingum í TGT og mælir tí til, at ein slíkur verður orðaður. Arbeiðsbólkurin metir, at avgerðarrætturin um broytingar eigur at liggja hjá stýrisbólkinum – og harvið ikki hjá einstøku pørtunum. Tað hevur tó stóran týdning, at møguligar broytingar verða væl grundaðar, og tí verður mett skilabest fyri samstarvið partanna millum og fyri fakligu dygdina, at allar broytingar verða gjørdar eftir tilmæli frá viðkomandi leiðslum. Harumframt er umráðandi at stovnar hvør í sínum lagi kunna allar partar, tá ið teir gera innanhýsis broytingar í teirra mannagongdum, ið eru viðkomandi fyri TGT-samstarvið. Um hesar broytingar ávirka teirra leiklut og viðvirkan í TGT, eiga hesar at vera umrøddar og góðkendar í stýrisbólkinum.

Arbeiðsbólkurin metir, at tað er eitt gott amboð at hava støðufrágreiðingar fyri at lýsa skipanina og at tað hevði givið meining um Almannaverkið ger hesar støðufrágreiðingar eina ferð árliga.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at Almannaverkið frameftir ger støðufrágreiðingar árliga og sendir hesar til Almanna- og mentamálaráðið eins og í dag. Í nýggja leistinum verður mælt til, at hesar harumframt verða viðgjørdar á árligum felagsfundi millum leiðslurnar á teimum stovnum, sum varða av TGT. Hesir hava áður verið Almannaverkið, Sernám og B&U psykiatri. Mælt verður til at víðka hetta, til eisini at fevna um Undirvísingarstýrið, og við einum umboði fyri dagstovnaøkið, ið Kommunufelagið velur. Arbeiðsbólkurin metir, at Almannaverkið skal bjóða til henda árliga fund, tí Almannaverkið hevur samskiparaleiklutin og ger støðufrágreiðingarnar, og harvið hevur størsta leiklutin, tá ið tað um samskipan ræður. Tað hevur tó týdning at hinir partarnir raðfesta hesar fundir og teirra leiklut í TGT.

Um árligi fundurin vísir, at onkur broyting ella tillaging skal gerast í TGT, skulu leiðslurnar gera eitt tilmæli til stýrisbólkin. Um partarnir vísa seg at vera ósamdir um, hvørt neyðugt er við tillagingum, kunnu teir hvør í sínum lagi lýsa teirra sjónarmið. Tilmæli ella lýsingarnar vera síðani lagdar fyri stýrisbólkin til støðutakan. Stýrisbólkurin tekur síðani avgerð um tillaging ella broyting skal gerast og um neyðugt er við politiskari støðutakan. Tá ið avgjørt verður at gera tillagingar, er umráðandi, at allir partar fáa kunning um hesar.

**13.** Mælt verður til, at Almannaverkið ger árligar støðufrágreiðingar, og sendir hesar til avvarðandi stjórnarráð og leiðslurnar, ið varða av TGT.

**14.** Mælt verður til, at ásett verður, at leiðslurnar, ið varða av TGT eru Almannaverkið, Sernám, B&U psykiatri, Undirvísingarstýrið og eitt umboð fyri dagstovnaøkið, ið Kommunufelagið velur.

**15.** Mælt verður til, at leiðslurnar, ið varða av TGT, hava ein árligan fund har støðufrágreiðingarnar verða viðgjørdar, og møgulig tilmælir um broytingar verða gjørd. Mælt verður til, at Almannaverkið bjóðar til hesar fundir.

16. Mælt verður til, at allar broytingar av TGT verða viðgjørdar og góðkendar av stýrisbólkinum. Mælt verður í hesum sambandi til, at avvarðandi leiðslur gera ítøkilig tilmæli til stýrisbólkin um broytingar. Leiðslurnar skulu somuleiðis tryggja, at Autismufelagið og aðrir viðkomandi partar eru hoyrdir, áðrenn tilmæli verða løgd fyri stýrisbólkin.

## 9.6 Samstarv millum partarnar rundanum netfundir

Tá ið stýrisbólkurin fyri TGT í desember 2017 tók avgerð um at gera nakrar tillagingar í skipanini, varð samstundis avgjørt, at Almannaverkið, Psykiatriski Depilin og Sernám skuldu hava dialogfundir tvær ferðir árliga. Endamálið við hesum fundum var m.a. at styrkja samstarvið millum partarnar, men eisini at taka faklig evni upp, sum eru viðkomandi fyri allar partar, í mun til TGT fundirnir, har familjan er í miðdeplinum, eru dialogfundirnir meira at rokna, sum eitt fakligt forum til tey, sum starvast í skipanini. Avgjørt varð, at Psykiatriski depilin skuldi vera vertur fyri fyrsta fund, og at partarnir síðani kundu avtalað sína millum, hvussu fundirnir frameftir verða skipaðir. Møguleiki var at hittast leiðslurnar ímillum, men eisini við øllum starvsfólkum, sum eru arbeiða í TGT.

Skipanin við dialogfundum varð íverksett frá 1. januar 2018 at rokna. Eftirmetingin hevur víst, at dialogfundir vórðu hildnir fyrstu tíðina, men at skipanin við dialogfundum síðani er dottin niðurfyri. Arbeiðsbólkurin hevur fingið upplýst, at seinasti dialogfundur varð hildin í 2019.

Almannaverkið og Sernám vísa á, at tað er óheppið, at skipanin við dialogfundum er dottin niðurfyri. Dialogfundirnir eru eftir teirra tykki eitt gott átak, har møguleiki er at viðgera samstarvið partanna millum, eins og evni av meiri fakligum slagi kunnu takast upp. Almannaverkið heldur tó samstundis, at tað eigur at verða umhugsað, um aðrir viðkomandi partar skulu luttaka á fundunum, t.d. Kommunufelagið, Autismufelagið og Undirvísingarstýrið. Somuleiðis kann eftir teirra tykki vera tørvur á einari greiðari støðutakan til, um tað er leiðslan ella starvsfólk, sum skulu hittast til dialogfundir.

B&U psykiatriin vísir á, at tey eru sinnaði at luttaka á dialogfundum, um hesir verða tiknir upp aftur. Ein fortreyt fyri hesum má tó eftir teirra tykki vera, at allir partar eru sinnaðir fyri hesum. Eisini verður víst á, at tørvur er á at gera sær greitt, hvat dialogfundirnir skulu snúgva seg um.

Sernám vísir á, at dialogfundir bert hava verið nakrar fáar ferðir, síðani skipanin varð tillagað. Í hesum sambandi hava bæði leiðsla og starvsfólk luttikið. Sernám hevur víst á, at tey meta at ein mangul við TGT í dag, er at partarnir kunnu møtast í einum fakligum forum. Sernám metir, at ein mangul við verandi skipan er, at fakfólkini, sum eru um barnið, ikki hava eitt fakligt forum, at umrøða og avtala ítøkiligar ætlanir, avbjóðingar og loysnir. Um ynski er um at hava hesa vitanardeiling meira yvirskipaða, har talan ikki er um einstøk mál, so ber til at nýta dialogfundir til tílíka vitanardeiling. Sernám metir tí, at tørvur er á at hava hesar fundir, og at teir áttu at verið tiknir uppaftur.

Arbeiðsbólkurin staðfestir, at skipanin við dialogfundum formliga enn er galdandi, men at hon ikki verður fylgd. Somuleiðis kann staðfestast, at allir partar tykjast sinnaðir til at luttaka í regluligum dialogfundum. Partarnir eru tó ikki heilt á einum máli um, hvørt dialogfundirnir eiga at vera skipaðir á tann hátt, sum tillagingin frá 1. januar 2018 leggur upp til. Mett verður tí, at tørvur er á at finna felags stev í mun til, hvussu dialogfundir skulu skipast.

17. Mælt verður til, at leiðslurnar fyri Almannaverkið, B&U psykiatriina og Sernám gera eitt tilmæli til stýrisbólkin fyri TGT um, hvørt dialogfundirnir skulu takast uppaftur, í hvørjum líki hetta so skal gerast, og hvørjir partar verða mettir viðkomandi at luttaka á dialogfundum.

# 10. Fíggjarligar avleiðingar

Í arbeiðssetninginum var arbeiðsbólkurin biðin um at koma við tilmælum um neyðugt er við tillagingum í TGT, harundir um fíggjarligar- og fyrisitingar broytingar eru neyðugar.

Arbeiðsbólkurin metir ikki at tað er gjørligt at koma við neyvum fíggjarligum metingum av tilmælunum, við tað at TGT er ein skipan, sum er tætt knýtt av øðrum skipanum og tilboðum, eins og at eitt nú leisturin áðrenn autisma er staðfest, í stóran mun er galdandi fyri øll børn, og ikki bert, tá ið talan er um autismu.

Viðvíkjandi ávísingartilgongdini til B&U psykiatri so metir arbeiðsbólkurin, at tað eru uppgávur á hesum øki, sum heilt ella partvís ikki vera lyftar av verandi skipanum. Mælt verður tí til at politisk støða verður tikin til, hvør ella hvørji skulu ávísa til B&U psykiatri, og hvussu uppgávubýti skal vera millum partarnar.

Avbjóðandi er at meta um fíggjarligar avleiðingar av hesum tilmæli. Hetta er millum annað tí, at talan ikki einans er um einstakar eygleiðingar ella kanningar, ið vænta í ávísingartilgongdini. Skal arbeiðsbólkurin koma við einum boði uppá fíggjarligar avleiðingarnar, er tørvur á at hækka játtanina til viðkomandi stovn við áleið 4 – 5 størvum svarandi til 4 mió. kr. árliga. Samstundis er neyðugt at hava í huga, at um ein tílík skipan verður sett í verk, ið er „filtrið" til B&U psykiatri, so kann hugsast at tað fer at hava sparingar við sær aðrastaðni, við tað at hetta minkar um trýstið í B&U psykiatriini, eins og at børn fáa hjálp fyrr, og tí hava tørv á minni umfatandi hjálp.

Viðvíkjandi tilmælinum um at skipa fundir í skiftum, og at samskiparin framhaldandi hevur árligt samband við familjurnar, so verður mett, at talan ikki er um eyka arbeiði hjá Almannaverkinum, í og við, at tey longu nú hava árligt samband við foreldrini, tá ið tey avtala árliga fundin. Tó má hædd takast fyri, at um avgjørt verður at vaksa um uppgávuna hjá samskiparanum í mun til uppfylging, so má játtan setast av til hetta endamál.

Mett verður at neyvari metingar um fíggjarligar avleiðingar kunnu gerast eftir at arbeiðsdagar hava verið millum partarnar.



FØROYA LANDSSTÝRI